# MASKINMEISTARIN

Nr. 18 / Mai 2023



# Arnfinn Bech er nýggjur formaður



## Tamur aðalfundur



## Skipaferðslan verður grønari



## Mortan nývaldur og Regin afturvaldur



## SEV riggar til orkuskifti

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
Vanliga eru fýra útgávur um árið.

**Blaðnevnd**
Arnfinn Bech, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda Maskinmeistaran, kunnu boða frá hesum í telduposti til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið;

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt.
MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
Arnfinn Bech er nýggjur formaður: Ingolf S. Olsen
Tamur aðalfundur: Ingolf S. Olsen
Skipaferðslan verður grønari: Grækaris Djurhuus Magnussen
Mortan nývaldur og Regin afturvaldur: Ingolf S. Olsen/privatmynd
SEV riggar til orkuskifti: Øssur Winthereig

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
502022

**Prent og liðugtgerð**
Føroyaprent
info@foroyaprent.fo
314555

Upplag: 800

# INNIHALD

Oddagrein ..... 3
Av gøtuni í formanssessin ..... 4
Privata virksemið vann ..... 8
Tamur aðalfundur hóast stórt umskifti ..... 10
Neyðugt at økja trygdina í Arktis ..... 13
Tíðindaskriv frá norðurlendsku maskinmeistarafeløgunum ..... 15
NMF-fundur á Svalbard ..... 16
Nógvar royndir við grønari skipaferðslu ..... 18
Støðug útbygging av elnetinum ..... 22
Regin afturvaldur ..... 26
Mortan er nýggjur í nevndini ..... 28
Sjúrður bleiv fagnaður ..... 30
Finnur er nýggjur skrivstovuleiðari ..... 32
Tríggjar prógvhandanir ..... 34
Minningarorð um Poul Hera Selfoss ..... 37
Tíðindi ..... 38
Føðingardagar ..... 39

# Karmar seta samráðingar í ófrælsi

Góðu limir, hetta er mín fyrsta oddagrein í Maskinmeistaranum, og vil eg sum tað fyrsta takka tykkum øllum fyri heiðurin og tað stóra álitið, tit hava sýnt mær við at velja meg sum formann uttan mótvalevni.

At vera formaður í Maskinmeistarafelagnum er tó mest av øllum ein stór ábyrgd. Tað er ein ábyrgd mótvegis øllum samfelagnum, men í fyrsta lagi er tað mín ábyrgd at stríðast fyri og verja áhugamálini hjá limum felagsins. Hesa ábyrgd ætli eg at taka á meg og eftir besta førimuni royna at liva upp til hvønn dag.

Vit skulu verja vunnin rættindi og stríðast fyri nýggjum. Og hesar avbjóðingarnar hava vit í ríkiligt mát framman fyri okkum júst nú við teimum mongu sáttmálunum, ið skulu endurnýggjast.

Hyggja vit at samráðingunum á tí almenna føroyska arbeiðsmarknaðinum, so má eg tíverri staðfesta, at har er ongin frælsur arbeiðsmarknaður til. Almennu arbeiðsgevararnir smoyggja ein karm oman yvir øll sáttmálaøkini, tá sáttmálin við tað fyrsta felagið í røðini verður undirskrivaður, og síðan er tað bara ”take it or leave it” hjá hinum feløgunum – karmurin má ikki vikast, siga landsalmennu og kommunalu arbeiðsgevarafeløgini.

Tað er væl saktans ein viðurkenning av hesum, at landsins stjórn nú heldur tað vera neyðugt at lyfta ávísar lønarbólkar einsæris upp í løn – uttan um karmar og uttan um sjálvar sáttmálasamráðingarnar.

Eg tulki tað sum eina viðurkenning av,



at karmurin læsir alt fast og setur vanligu samráðingarnar í ófrælsi.

At talan ikki er um frælsar samráðingar, eri eg púra samdur í, men tað eru ikki bara tey fáu feløgini á heilsu- og umsorganarøkjunum, ið ætlanin er at geva lønarlyft, sum eru afturúrsigld lønarliga her heima. Vit maskinmeistarar, til dømis, eru tað eisini.

Vit unna teimum tað væl, ið við beinleiðis politiskari hjálp fáa eitt lønarlyft nú. Tær krónurnar fara vit ikki at berjast um, sjálvt um eg haldi, at vit so sanniliga eisini høvdu havt uppiborið somu sømiligu viðferð frá landsins leiðslu.

Í staðin mugu vit í Maskinmeistarafelagnum og í fleiri øðrum feløgum royna aðrar leiðir. Sjálvur ætli eg, at vit skulu brúka orku upp á at finna út av, hvat vit yvirskipað kunnu gera fyri, at samráðingarnar verða frælsar aftur – soleiðis at tað fer at bera til at samráða seg til batar út um karmin, har tað er eyðsýndur tørvur á tí – og ikki sum nú, har karmurin ikki má nertast, og feløgini hvørt í sínum lag bara mugu stroya hækkingina í karminum sum frægast út yvir limirnar.

Fyri at fáa eitt gott úrslit er tað umráðandi, at fyrireikingararbeiðið er gott. Tí fundast vit enn við álitisfólk, har álitisfólk eru, og tosa annars við limir fyri at fáa dagført tørvin. Tað eru jú maskinmeistararnir úti á teimum ymisku arbeiðsplássunum, ið best vita, hvat tørvurin er, og teir eru tí eisini teir hvassastu at seta orð á krøvini.

Tá hetta fyrireikingararbeiði er liðugt, eru vit klár at handa okkara krøv og samráðast sum ein felags eind – formaður, nevnd og allir limir.

Nógv annað spennandi arbeiði liggur eisini og bíðar. Grøna orkuskiftið er millum annað eitt, ið setur stór krøv bæði fakligt, tí her er talan um nógva nýggja tøkni, og fakfelagsliga, tí við orkuskiftinum verða nógv nýggj arbeiðsøki, meðan onnur helst minkað og hvørva, sum frá líður.

Hetta og mangt annað fara tit at frætta nógv meira um í komandi tíðum.

Góðan lesihug.

***Arnfinn Bech***



***formaður í Maskinmeistarafelagnum***

# Av gøtuni í formanssessin

**Arnfinn Bech ásannar, at hann ikki hevði væntað bara at blíva kosin til formann í Maskinmeistarafelagnum uttan mótvalevni, og at hann hevði betri vónir um ein nevndarsess enn formanssessin. Men hann fegnast um formanssessin og hevur nógv hugskot við sær í viðførinum**

Orð og myndir: Ingolf S. Olsen - PRESS

Tá hann boðaði frá uppstilling í desember, var Arnfinn Bech til reiðar at stríðast á tveimum mótum fyri at gerast partur av leiðsluni í Maskinmeistarafelagnum, tí hann bjóðaði bæði Tummasi Eli Høj Joensen, ið var formaður og hevði boðað frá uppstilling, av at dystast um formanssessin og stillaði eisini upp til nevndarvalið – um hann skuldi tapt dystin um formanssessin.

Men hann slapp frá at stríðast yvirhøvur, tí á aðalfundinum kundi hann lata seg kjósa til formann uttan mótvalevni, og av tí sama datt uppstilling hansara til ein vanligan nevndarsess eisini burtur.



*– Eg haldi í roynd og veru, at Maskinmeistarafelagið hevur verið ov tamt. Tað má røkka út um pallkantin, og neyðugt er, at tað verður meira sjónligt og setur sær meira týðulig mál, sigur Arnfinn Bech, nýggjur formaður í Maskinmeistarafelagnum*

**Formaðurin tók seg aftur**

9. februar, boðaði Tummas Eli Høj Joensen nevniliga frá, at hann kortini ikki ætlaði at halda fram sum formaður í Maskinmeistarafelagnum og tók tí sína uppstilling aftur. Freistin at stilla upp til formanssessin var farin 15. desember, og Arnfinn Bech var tískil einasta eftirverandi valevni.

– Ja, hetta bleiv eitt sindur løgið, tí eg væntaði í hvussu er ikki, at eg bara fór at kunna taka formanssessin uttan nakað sum helst stríð. Men sum eg skilti tað, gjørdi Tummas Eli av heldur at raðfesta sína fyritøku, og tað skilji eg væl. Vit kunnu so venda tí tann vegin, at fyrimunurin fyri limirnar, nú teir fáa meg, í hvussu er tann, at eg ógvuliga fegin vil hetta.

– Tí fór eg eisini beinanvegin undir at føra valstríð og reka, tá eg hevði gjørt av at stilla upp. Eg var og agiteraði fyri starvsfeløgum á SEV, hjá IRF, og har tey annars tímdu at lurta eftir

mær. Tey hugdu eitt sindur við, tí tað er helst ikki vanlig siðvenja í Maskinmeistarafelagnum, at menn koma so harðliga út, flennir Arnfinn Bech.

Ikki at hann annars leikaði so nógv í alment, meðan teir enn vóru tveir kandidatar til formanssessin, og hann eisini var valevni til nevndina. Umframt at vitja onkur arbeiðspláss avmarkaði valstríðið hjá Arnfinni seg til eina videosamrøðu við sjóvinnuportalin BFI, Blue Faroe Islands, og eina stutta valgrein sum uppslag á sínum egna Facebook-vanga. ”Elevator-talan”, kallar hann valgreinina, tí hann við henni klárar at greiða frá sínum hugsanum og ætlanum upp á ta tíð, tað hevði tikið at flutt seg nakrar hæddir í einum elevatori.

## Mentanarhvøkkur

Arnfinn Bech hevur búð og arbeitt í Danmark mesta partin av tíðini, eftir at hann hevði lokið prógv sum maskinmeistari á Vinnuháskúlanum í 2003. Í Danmark hevur hann allatíðina verið limiur í danska Maskinmeistarafelagnum og hevur eisini brúkt felagið nógv í sínum størvum sum fyrst vanligur maskinmeistari og tey seinastu nógvu árini í leiðarastørvum.

Á sumri í 2021 flutti familjan heimaftur, og hann byrjaði stutt eftir í starvi sum tekniskur leiðari hjá Strandfaraskipum Landsins.

Tað hevur alt gingið upp á stás, men fakfelagsliga var tað rættiliga kollveltandi at flyta aftur til Føroya, heldur hann. Lýti í arbeiðsmarknaðar- og fakfelagsviðurskiftum, ið hann ikki hevði gáað stórvegis um, áðrenn hann flutti niður fyrst í øldini, sá hann týðuligari nú, og skjótt búnaðist tankin um, at hann við sínum drúgvu royndum frá einum stórum og vælskipaðum arbeiðsmarknað sum tí danska kanska eisini hevði okkurt munagott at bjóða her heima í fakfelagshøpi.

– Hjá mær er nokkso stuttur vegur frá hugsan til gerð, so eg stillaði bara upp. Eg hevði kanska væntað meg havt betri møguleika at koma í nevndina fyrst, og tað mest vanliga er eisini, at tú ert nevndarlimur í nøkur ár fyrst og fært eitt sindur av royndum har, áðrenn tú verður valdur til formann. Hjá mær bleiv tað so øvugt, beint av gøtuni og í formanssessin, men eg havi góð og roynd fólk afturat mær, so tað tað skal nokk fara at ganga, sigur Arnfinn Bech.

## Út um pallkantin

Nýggi formaðurin hevur greið mál og greiðar ætlanir fyri, hvussu hann kann ganga á odda at fremja broytingar og seta síni fingramerki á framtíðina hjá Maskinmeistarafelagnum og maskinmestarafakinum í Føroyum.

Í Facebook-uppslagnum samanfataði hann sínar hugsanir og ætlanir í eina virkisskrá við fýra høvuðsmálum. Eftir teimum skal Maskinmeistarafelagið leysliga endurgivið

- vera meira sjónligt í tí almenna rúminum
- søkja enn tættari samstarv við onnur fakfeløg í Føroyum
- aktivt ráðgeva og leiðbeina limum í setanarviðurskiftum
- aktivt møta ungum og nýggjum starvsfeløgum, og geva teimum, ið eru framtíðin, sum felagið skal byggja á, ein pall og rúm.

– Eg haldi í roynd og veru, at Maskinmeistarafelagið hevur verið ov tamt. Vit mugu røkka longur út um pallkantin, og neyðugt er, at felagið verður meira sjónligt og setur sær meira týðulig mál. Hetta er ikki bara nakað, eg sleingi út fyri at gera meg klókari uppá alt, bara tí eg havi búð og arbeitt nøkur ár í Danmark – nei, hetta er tað, sum limir hjá Maskinmeistarafelagnum sjálvir hava sagt við meg, tá eg havi verið á teirra arbeiðsplássum, og sum fleiri teirra ringdu til mín um, tá tað fréttist, at eg stillaði upp.

– Eg visti til dømis væl, at Maskinmeistarafelagið hevði 600-700 virknar limir, og at teir eru í ymsum skipabólkum á sjónum og ymsum bólkum á landi eisini, men hvussu nógv onnur enn maskinmeistarar vita tað? Eg haldi, at føroyskir maskinmeistarar generelt eru ógvuliga lítillátnir og av tí sama alt ov lítið sjónligir. Og tað er eisini galdandi fyri sjálvt Maskinmeistarafelagið.



*– Eg ivist ikki í, at tað hevði borið væl til at savnað fleiri av teimum føroysku fakfeløgunum undir sama taki í onkrum slagi av fakligum húsi, har tú eisini hevði nógv fólk við servitan sitandi. Í dag verður ein stórur partur av allari fakligheitini útveittur til advokatskrivstovur í staðin, og tað kostar hvørjum felag eina rúgvu av pengum*

– Men tað nyttar ikki, vit mugu vera nógv meira sjónlig og í minsta lagi duga at definera okkum sjálv. Tað var eitt av mínum høvuðsargumentum, tá eg eftir uppstillingina var runt og prátaði við maskinmeistarar á Sundi og aðrastaðni, at tað er alt í lagi at krevja meira í løn, men tað er ongin, sum vil geva okkum meira í løn, um vit maskinmeistarar ikki eru sjónligir og bæði tora og duga at siga, hví vit halda okkum vera verdar meira í løn, sigur Arnfinn Bech.

Hann leggur dent á, at tað snýr seg um at verða meira sjónlig, bæði saman sum fakfelag og sum fakfólk hvør sær.

– Vit kunnu saktans vera meira sjónlig í tí almenna kjakinum sum felag og sum einstaklingar. Og sanniliga eisini reint fakliga. Um tú hyggur at tøkniligum

hendingum, tað kann vera ein nýggj battaríSkipan hjá SEV, sum verður tikin í brúk, ella okkurt sovorðið, so er tað altíð ein leiðslupersónur ella ein verkfrøðingur, sum stendur fremst og fortelur og forklárar, og ikki ein, sum skal arbeiða við hesum í gerandisdegnum, nevniliga ein maskinmeistari. Men her er tað helst aftur hetta, at maskinmeistarar kanska halda seg meira aftur og vilja helst ikki standa fremst, sigur hann.

## Samstarvandi fakfeløg

Tá Arnfinn Bech tosar um tættari fakfelagssamstarv er tað serliga serfrøði og servitan í umsitingini, hann hugsar um.

– Eg ivist ikki í, at tað hevði borið væl til at savnað fleiri av teimum føroysku fakfeløgunum undir sama taki í onkrum slagi av fakligum húsi, har tú eisini hevði nógv fólk við servitan sitandi – onkur serkønur í almennari lóggávu, onkur í búskapi, onkur í pensjónum, og hvat veit eg. Í dag verður ein stórur partur av allari fakligheitini útveittur til advokatskrivstovur í staðin, og tað kostar hvørjum felag eina rúgvu av pengum.

– Við at húsast saman kundu feløgini sparrað saman og býtt útreiðslurnar til bæði hús og fakfólkini, sum ofta kosta nógv, og tískil bleiv ein nógv størri partur av orkuni hjá teimum einstøku feløgunum tøkur til veruligu kjarnuuppgávuna hjá einum fakfelag, nevniliga at ráðgeva og leiðbeina limirnar í sáttmálaviðurskiftum og setanarviðurskiftum, sigur hann.



*– Vit vita, at tað er ímillum tey ungu, at tey góðu hugskotini blóma, og tey ungu eru full av orku og árœði. Tað er tey, sum framtíðin skal byggjast á, og tí hava vit brúk fyri, at tað verður skapt eitt umhvørvi í felagnum, sum lokkar tey ungu at vera aktiv og fær tey at trívast sum fakfelagslimir. Eitt gott stað at byrja er á Vinnuháskúlanum, vit skulu vera aktiv sum fakfelag har og ikki bara møta upp, tá prógvhandan er á skránni*

## Servitan og ráðgeving

Nýggi formaðurin leggur dent á, at hann við tættari fakfelagssamstarvi ikki neyðturviliga heldur, at tað altíð er skilagott við felags sáttmálasamráðingum.

– Tey trý stóru føroysku manningarfeløgini hava ofta samráðst saman, men eg veit ov lítið um akkurát ta søguna til at hava avgjørdar meiningar um hana. Sjálvandi skal mann altíð vurdera, um meira kann fáast burtur úr at fara í samráðingar saman við øðrum feløgum ella ikki. Tað er greitt, at fert tú í samráðingar saman við nøkrum øðrum lønarbólkum, sum liggja á einum lægri lønarstigi, so kemur tú valla út sum vinnarin; tað verður tann, sum liggur við tí lægra lønarlagnum, ið vinnur mest har. Men so kunnu tað vera samráðingar, har aðrir spurningar enn lønin viga meira, at tað er ein fyrimunur at samráðast saman við øðrum, sigur Arnfinn Bech.

– Tað er tann umsitingarligi og ikki minni tann ráðgevandi leikluturin, sum vigar mest, tá eg tosi um fakfealgssamstarv. Tí tá felagið hevur gjørt sáttmálar at ganga eftir, um tað so er einsamalt ella saman við øðrum, og aðrar skipanir, og limir so ringja inn og spyrja um hetta og hatta ella skulu hava hjálp til okkurt í gerandisdegnum, so krevst tað, at fakligheitin er á staðnum, so teir beinanvegin kunnu fáa eitt greitt svar.

– Og sama, um samstarvandi fakfeløgini samráðast saman ella hvør sær, so

hevur eitt umsitingarligt samstarv við felags serfrøði eisini alstóran týdning í sambandi við sjálvar sáttmálasamráðingarnar. Arbeiðsgevararnir hava jú Vinnuhúsið við sínum serfrøðingum og allari vitanini, sum fólk við ymiskum førleikum akkumulera í húsinum. Skulu fakfeløgini matsja tað, so mugu tey eisini brynja seg saman, sigur hann.

### Fáa tey ungu við

So er tað teir ungu limirnar, sum Arnfinn Bech heldur, at Maskinmeistarafelagið higartil hevur givið sær ov lítið far um.

– Vit vita, at tað er ímillum tey ungu, at tey góðu hugskotini blóma, og tey ungu eru full av orku og áræði. Tað er tey, sum framtíðin skal byggjast á, og tí hava vit brúk fyri, at tað verður skapt eitt umhvørvi í felagnum, sum lokkar tey ungu at vera aktiv og fær tey at trívast sum fakfelagslimir. Eitt gott stað at byrja er á Vinnuháskúlanum, vit skulu vera aktiv sum fakfelag har og ikki bara møta upp, tá prógvhandan er á skránni, leggur hann dent á.

Hann hevur tó ikki kenslu av, at ungir og nýklaktir maskinmeistarar í Føroyum hava hug at venda Maskinmeistarafelagnum bakið.

– Nei, tað havi eg ikki, men tá eg tosi við teir, so tykjast teir í nokkso stóran mun síggja tað soleiðis, at ”felagið er har, og vit eru her”. Tað verður ringt til felagið, tá tað ítøkiliga er brúk fyri tí, tí onkur hevur rent seg í trupulleikar, men annars er lítið samband. Soleiðis skal tað ikki vera, vit eiga aktivt at skapa eitt umhvørvi, eitt forum, har vit onkursvegna fáa tey ungu ordiliga við í felagsarbeiðið.

- Eg veit, at tey í danska maskinmeistarafelagnum ikki bara fara á vitjan á maskinskúlunum at handa eina gávu, tá tað er próvtøka, men eisini við jøvnum millumbilum fara út á skúlarnar at greiða frá felagnum, arbeiðinum, tað ger, og hvussu tað aktivt kann brúkast og tæna ungu maskinmeistarunum, greiðir Arnfinn Bech frá.



*– Tá tú ígjøgnum eitt heilt arbeiðslív rindar eitt prosent av lønini í limagjaldi, so skalt tú eisini kunna síggja eitt sindur aftur, tá tú ert farin av arbeiðsmarknaðinum*

### Virknan seniorpolitikk

Sjálvt um tað ikki er nevnt beinleiðis í valgreinini – elevatortaluni – so leggur nýggi formaðurin dent á, at Maskinmeistarafelagið eisini skal verða meira virkið í hinum endanum á aldursstiganum við einum virknum seniorpolitikki.

– Tá tú ígjøgnum eitt heilt arbeiðslív rindar eitt prosent av lønini í limagjaldi, so skalt tú eisini kunna síggja eitt sindur aftur, tá tú ert farin av arbeiðsmarknaðinum. Aftur har kann eg taka danska felagið sum dømi. Tað skipar eitt nú fyri seniortúrum, har farið verður út á virki at hyggja at ymiskari nýggjari tøkni og sovorðnum, og so fáa luttakararnir ein bita og okkurt leskiligt onkrastaðni. Tað er kvalitetstíð, sum verður hámett av teimum eldru limunum.

– Men tað krevur, at tú hevur eitt aktivt og útvent felag, og tað fært tú við at fáa ung fólk inn og aktivera tey, tí tað er oftast frá teimum, at nýggju hugskotini koma, meðan vit tilkomnu oftari hava lyndi at siga, at hetta og hatta ber ikki til.

– Felagið skal verða meira sjónligt og aktivt úteftir og eisini inneftir í limarøkt, og har er ein aktivur juniorpolitikkur neyðugur fyri eisini at hava ein góðan og aktivan seniorpolitikk, sigur Arnfinn Bech.

### Halda eyga við avtalum

Hann endaði sína stuttu valgrein við at gera greitt, at Maskinmeistarafelagið skuldi hava ein virknan politikk um, at limir ikki mugu gera lokalavtalur og starvssáttmálar, sum máa støðið undan sáttmálunum, sum felagið hevur gjørt, og harvið eisini undan sjálvum felagnum.

– Tú kanst siga, at tað ikki átti at verið neyðugt at havt ein politikk um hetta, tí tað er jú sáttmálabrot og tískil ikki loyvt at gera avtalur, sum ikki eru í samsvari við galdandi sáttmálar. Vit vita kortini, at hetta hendir av og á í øllum fakfeløgum. Ofta er tað bara vantandi vitan um sáttmálaásetingarnar ella gáloysni, ið er orsøk til, at onkur skrivar undir eina starvsavtalu, sum er verri enn tað, ið sáttmálin sigur. Men tað má ikki henda, og tí skulu vit hava ein virknan politikk á hesum økinum, har tað gerst ein føst mannagongd, at limir spyrja seg fyri hjá álitisfólki ella sjálvum felagnum, áðrenn teir skriva undir nakað. Tað er sjálvandi alt í lagi at gera eina avtalu, sum er betri enn sáttmálin, men tað ber als ikki til, at avtalur verða gjørdar, sum eru verri, leggur Arnfinn Bech dent á.

Nú hann hevur tikið sæti á stjórnarskrivstovuni hjá Maskinmeistarafelagnum á Grønlandsvegnum hevur hann eisini leigað sær eina íbúð í Havn at húsast í arbeiðsdagarnar, men bústaðurin hjá familjuni verður framhaldandi á Tvøroyri, har tey øll trívast væl.

Arnfinn Bech er 49 ár og ættaður úr Lopra. Konan Emilia, sum er ættað av Tvøroyri, er ergoterapeutur og arbeiðir í Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy. Saman eiga tey tveir dreingir, Erik og Magna, sum eru ávikavist 12 og seks ár.

# Privata virksemið vann

**Tummas Eli Høj Joensen var formaður í Maskinmeistarafelagnum í fimm mánaðir og dróg á bæði, um hann skuldi bjóða seg fram at halda fram. Tað gjørdi hann í fyrstu syftu, tá tað sá út til, at vandi annars var fyri formansloysu í felagnum. Men tá tað so var greitt, at eitt annað valevni bjóðaði seg fram, umhugsaði Tummas Eli støðuna av nýggjum. Endin varð, at hann tók sína uppstilling aftur fyri fult og heilt at kunna savna seg um sína egnu fyritøku, klassafelagið Bureau Veritas Føroyar**



*– Tað krevur sítt at vera einsamallur um eina fyritøku sum Bureau Veritas Føroyar, og tað er ikki nógv at geva út av, um ein formanssessur sum hesin so eisini skal røkjast til lítar við síðuna av. Eg kundi sjálvandi bara stilla upp til nevndina aftur, men eg kom til ta niðurstøðu, at frægast bara var at siga, at hetta var tað, sigur Tummas Eli Høj Joensen*

Orð og myndir: Ingolf S. Olsen – PRESS

Tummas Eli Høj Joensen hevði sína fyrstu og – í hvussu er enn – einastu formansfrágreiðing á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum. Hann tók við sum formaður 1. september í fjør, tá undanmaðurin Ólavur Gunnarsson vegna nýtt starv fór frá í ótíð.

Tummas Eli var eisini formansvalevni til 9. februar, tá hann boðaði frá, at hann tók sína uppstilling aftur. Hann hevði ikki boðað frá uppstilling til nevndina, áðrenn freistin fyri at boða frá uppstilling áðrenn aðalfundin var úti 15. desember, og hann lat seg heldur ikki stilla upp á sjálvum aðalfundinum.

Tískil var aðalfundurin eitt farvæl til bæði formanssess og nevnd fyri hansara viðkomandi. Tað býr tó als onki stríð ella rumbul undir avgerðini hjá Tummas Eli.

– Eg havi allatíðina verið ivasamur um formanssessin, tí tað er eitt fulltíðarstarv at vera formaður í Maskinmeistarafelagnum. Tað endaði tó við, at eg játtaði at taka við formanssessinum í fjør, tá Ólavur Gunnarsson við lutfalsliga stuttum skotbrá fór frá, men eg tók við við tí treyt, at formansval skuldi verða á næsta aðalfundi, sjálvt um formansskeiðið hjá Ólavi ikki hevði runnið út fyrr enn næsta ár.

– Tað krevur sítt at vera einsamallur um eina fyritøku sum Bureau Veritas Føroyar, og tað er ikki nógv at geva út av, um ein formanssessur sum hesin so eisini skal røkjast til lítar við síðuna av. Eg kundi sjálvandi bara stilla upp til nevndina aftur, men eg kom til ta niðurstøðu, at frægast bara var at siga, at hetta var tað, sigur Tummas Eli Høj Joensen.

## Gjøllig frágreiðing

Í síni formansfrágreiðing tók hann



*Arnfinn Bech lýddi við áhuga á formansfrágreiðingina hjá Tummas Eli Høj Joensen. Fráfarandi formaðurin hevði fleiri góð ráð til nýggja formannin, og heitti á hann "um at røkja starvið við størstu virðing og eyðmjúkleika mótvegis øllum samstarvsfeløgum"*

gjølliga saman um sína tilgongd til formanssessin, og tað, sum síðan er hent. Fráfarandi formaðurin greiddi soleiðis frá:

"Nú er ein tíð liðin, síðan eg av heilt serligum orsøkum tók við sum formaður í Maskinmeistarafelagnum tann 1. september 2022, og má eg siga, at tíðin síðan tá hevur verið sera spennandi, hendingarík og ikki minst lærurík fyri meg persónliga.

Sum tit øll vita, valdi Ólavur at taka við øðrum starvi og fór tí frá í ótíð; hetta stillaði nevndina í eina støðu, sum mátti loysast so ella so.

Nevndin og vit øll vistu, at felagið skuldi ígjøgnum drúgvar samráðingar í oktober, so alneyðugt var at bera skjótt at, og tað var eisini í huganum at hava onkran at føra hetta víðari, sum hevði verið við til slikt áður.

Valið stóð tí ímillum:

1. at hava eyka aðalfund og velja ein nýggjan formann

2. velja ein formann fyri restina av formanskeiðinum hjá Ólavi ella,

3. sum eg sjálvur vildi tað, ein ið skuldi sita til komandi aðalfund.

Eg helt, at ein formaður í felagnum skuldi vera ein, sum er valdur av limunum, og tí bleiv uppskot 3 valt.

Onkur mátti so taka sær av formanssessinum til komandi aðalfund, og tá næstformanninum barst frá, og eg kundi laga míni arbeiðisviðurskifti soleiðis, at tað bar til at røkja formansstarvið eisini, bleiv tað til, at eg eftir áheitan játtaði at taka við sum formaður við treytum, sum vóru, at øll viðurskifti vórðu at rokna, sum um eg var ein valdur, fulltíðarsettur formaður.

Á nevndarfundi tann 16. august bleiv eg so valdur av nevndini til fulltíðarsettan formann fram til komandi aðalfund, og annars varð eg frítt stillaður, hvussu eg skipaði arbeiðið – eisini við atliti at at vera til staðar á skrivstovuni.

Eyðbjørn Larsen advokatur metti, at omanfyri nevnda tilgongd til formansskiftið ikki er í andsøgn við galdandi lóg fyri Maskinmeistarafelagið.

Eg havi so fyri tað mesta verið á skrivstovuni hjá felagnum og tikið mær av øllum uppgávunum, sum ein formaður ger.

Og eg má siga, at tað hevur verið mær ein fragd at arbeitt saman við øllum hesu sera fittu fólkunum, ið ein javnan hittir á kontórinum.

Eg var leingi ivasamur um, hvørt eg skuldi stilla upp til formann til núverandi aðalfund, tí eg havi eitt gott starv framanundan. Eg bíðaði til seinastu freist og stillaði so upp, tí eingin annar stillaði upp, hettar var fyrrapart á degi 15/12, men seinnapartin sama dag fingu vit ein teldupost, har Arnfinn Bech bjóðaði seg fram sum formansvalevni – mann kann siga, at "mission completed", eg siti sum formaður til tann 11. mars, og so tekur ein av limunum "valdur formaður" við. Eg gjørdi tí av, tá eitt sindur av tíð var fráliðin, at taka meg aftur sum formansvalevni.

So eftir hendan fundin eitur formaðurin Arnfinn Bech, og eg fari í hesum sambandi at ynskja honum til lukku við starvinum og heita á hann um at røkja starvið við størstu virðing og eyðmjúkleika mótvegis øllum samstarvsfeløgum."

Formansrøðan hjá Tummas Eli Høj Joensen er í fullari longd løgd á heimasíðuna hjá felagnum, og í einum øðrum blað verður ein longri samrøða við hann.

# Tamur aðalfundur hóast stórt umskifti

**Regin Olsen bleiv afturvaldur, og Mortan Sólheim Thomsen nývaldur í nevndina í Maskinmeistarafelagnum. Dystarval var um nevndarsessirnar, men talan var um ein skjótt avgreiddan aðalfund uttan stórvegis kjak, hóast nógv er hent í felagnum hetta seinasta árið, og umfatandi sáttmálasamráðingar eru fyri framman**



*Fundarfólkið lurtaði við áhuga á aðalfundinum, sum í ár var á Panorama á Hotel Hafnia*

Orð og myndir: Ingolf S. Olsen – PRESS

Sjáldan, um nakrantíð áður, hevur leiðslan í Maskinmeistarafelagnum verið ígjøgnum eitt so stórt umskifti, sum tað, ið er farið fram í skeiðnum ímillum teir báðar seinastu aðalfundirnar.

Tvey formansskifti hava verið. Tíðliga í fjør summar boðaði Ólavur Gunnarsson nevndini frá, at hann ætlaði sær frá sum formaður 1. september, tí hann hevði fingið annað arbeiði. Nevndin samdist síðan um at velja Tummas Eli Høj Joensen, ið frammanundan var nevndarlimur, til formann, tí Regin Olsen, ið var næstformaður, bar seg undan at taka við formanssessinum.

Formansskiftið 1. september hevði við sær, at nevndin mátti umskipast, og Poul Heri Selfoss, ið var fyrsti tiltakslimur, tók fast sæti í nevndini fyri Tummas Eli Høj Joensen, ið nú var vorðin formaður. Beint fyri nýggjár hendi so tað ógvuliga syrgiliga, at Poul Heri Selfoss brádliga doyði. Róald Johannesen, annar tiltakslimur, tók síðan sæti í nevndini restina av skeiðinum fram til aðalfundin.

## Valspenningur

Beint undan jólum varð greitt, at spenningur fór at verða um formansvalið, tí tá freistin at stilla upp var úti 15. desember, vóru tvey valevni: Tummas Eli Høj Joensen, sitandi formaður, og Arnfinn Bech.

Arnfinn Bech hevði eisini boðað frá uppstilling til nevndina, so trý valevni vóru til tveir nevndarsessir: Regin Olsen, Mortan Sólheim Thomsen og Arnfinn Bech.

Spenningurin var sostatt í hásæti um leiðsluna í Maskinmeistarafelagnum,



*Petur Olsen, ið arbeiðir hjá Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum, talaði fyri bøttum lønarkorum hjá maskinmeistarunum á landi, tá hann á sjálvum aðalfundinum bjóðaði seg fram til ein nevndarsess. Men uttan brævatkvøður rakk tað ikki*



*Sjúrður Heinesen takkar fyri seg. Hann hevur verið skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum í 24 ár, men seinastu tíðina er sjónin versnað so nógv, at hann ikki helt tað vera ráðiligt at halda fram í arbeiðinum*





*Tað kom dátt við, at skrivstovuleiðarin segði seg úr starvi nú, tí við honum fer nógv vitan úr húsinum, segði Arnfinn Bech, nýggjur formaður í Maskinmeistarafelagnum. Hann ætlar, at felagið fram eftir skal finna út av at varðveita vitan og royndir í felagnum*

tá landið legði stilt um jóla- og nýggjárshøgtíðina.

Spenningurin helt sær til 9. februar. Tá boðaði Tummas Eli Høj Joensen frá, at hann tók sína uppstilling til formanssessin aftur, og tí var greitt, at Arnfinn Bech bleiv nýggjur formaður í felagnum. Av tí sama var hann heldur ikki longur valevni til nevndina.

Endiliga segði Sjúrður Heinesen, ið hevur verið skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum síðan 1999, seg úr starvinum frá 1. apríl at rokna. Sjúrður Heinesen hevur rokkið pensjónsaldur, men tað er viknandi sjónin, ið er beinleiðis orsøkin til, at hann segði upp nú.

Sjúrður Heinesen hevði tó lovað at verða tøkur at heita á hjá formanni og nevnd og nýggja skrivstovuleiðaranum, tá hesin var funnin.

## Tamur fundur

Hendingaríka nevndarráríð hjá Maskinmeistarafelagnum og eitt nú umfatandi sáttmálasamráðingarnar, ið eru fyri framman, merktu tó ikki aðalfundin stórvegis. Í so máta var talan um ein taman aðalfund.

Formansrøðan hjá Tummas Eli Høj Joensen og roknskapurin vórðu tikin til eftirtektar uttan stórvegis viðmerkingar, og restin av skránni varð eisini avgreidd uttan nakað hóvasták.



*Jógvan Isaksen úr Klaksvík er trúgvur luttakari á aðalfundunum hjá Maskinmeistarafelagnum og hann rósti Sjúrði Heinesen fyri at hava fingið skil á bæði skrivstovuhaldið og fíggjarviðurskiftini hjá felagnum*



*Atkvøðugreiðsla um nevndarsessirnar. Jóan Petur Patursson, fyrrverandi nevndarlimur, savnar atkvøðuseðlarnar inn*



*Tummas Eli Høj Joensen takkaði fyri gott samstarv við nevnd og umsiting í síni stuttu formanstíð og hevði nógv rósandi orð til fráfarandi skrivstovuleiðaran Sjúrð Heinesen*

Nakað av spenningi bleiv tó um nevndarvalið, tí á sjálvum aðalfundinum stillaðu Petur Olsen og Pól Jákup Larsen eisini upp. Brævatkvøður vóru tó bara til Regin Olsen og Mortan Sólheim Thomsen, tí teir høvdu boðað frá uppstilling áðrenn 15. desember, og tí vunnu teir báðir eisini greitt báðar nevndarsessirnar við ávikavist 23 og 31 atkvøðum. Brævatkvøðurnar vóru umleið eins nógvar í tali og talið á luttakarum á sjálvum aðalfundinum.

Petur Olsen og Pól Jákup Larsen blivu síðan valdir sum ávikavist fyrsti og annar tiltakslimur.

## Saknur í Sjúrði

Tá formliga skráin fyri aðalfundin var av, nýttu fleiri høvið at taka orðið at bera fram góðynski.

Jógvan Isaksen úr Klaksvík var ein teirra, og hann takkaði serliga Sjúrði Heinesen fyri at hava tænt Maskinmeistarafelagnum væl. Jógvan Isaksen greiddi frá, at hann hevði verið á aðalfundum hjá felagnum síðan 1986, og at fíggjarstandurin var alt annað enn góður tey fyrstu nógvu árini. Men tá Sjúrður Heinesen bleiv settur í starv, kom skil í, og tað hevði tað verið síðan.

Sjúrður Heinesen tók eisini sjálvur orðið og takkaði fyri tíðina. Hann greiddi millum annað frá, at hann hesi 24 árini á skrivstovuni hevur virkað undir ikki færri enn sjey formonnum, tá nýggi formaðurin er íroknaður. Tey fyrstu nógvu árini hevði tað verið eitt rættiliga stórt upptak, og tað var serliga orkukrevjandi, tí hann tá oftast var einsamallur á skrivstovuni. Tað var nevniliga ikki fyrr enn í 2012, at tað bleiv fulltíðarstarv at vera formaður í felagnum.

Eisini Tummas Eli Høj Joensen rósti fráfarandi skrivstovuleiðaranum, tá hann takkaði fyri góða samstarvið, hann hevði havt við nevnd og umsiting í síni stuttu formanstíð, og tað sama gjørdi næstformaðurin Regin Olsen, tá hann takkaði fyri sítt afturval.

## Varðveita vitan

At enda tók eisini nýggi formaðurin Arnfinn Bech orðið.



*Regin Olsen takkað fyri afturvalið – hann fer nú undir sítt 12. valskeið í Maskinmeistarafelagnum*

Hann vissaði um, at tað var við virðing og eyðmýkt, at hann setti seg í formanssessin í Maskinmeistarafelagnum, og hann duldi ikki fyri, at tað kom honum heldur dátt við, at skrivstovuleiðarin hevði sagt seg úr starvi, tó at hann væl skilti orsøkina.

– Tað er eyðsæð, at tað fer nógv vitan úr húsinum saman við Sjúrði Heinesen – tað snýr seg millum annað um meira enn 20 ára royndir í samráðingartekníkki, staðfesti Arnfinn Bech og sipaði til allar sáttmálasamráðingarnar, ið eru fyri framman.

Men júst hesa í løtuni keðiligu støðu ætlar nýggi formaðurin at brúka til at fáa okkurt gott burtur úr ásannandi, at í hvørjum einasta starvsfólki og nevndarlimi hópar vitan seg upp.

– Vit mugu finna út av, hvussu vit fram eftir skulu gera, so at vit varðveita hesa vitan í felagnum, sjálvt um persónar koma og fara, segði Arnfinn Bech.



*Nýggja nevndin í Maskinmeistarafelagnum. Úr vinstru eru tað Ólavur Østerø, Regin Olsen, Arnfinn Bech, formaður, Rógvi K. Hansen og Petur Olsen, tiltakslimur. Mortan Sólheim Thomsen, nývaldur nevndarlimur, og Pól Jákup Larsen, nývaldur tiltakslimur, vóru báðir útmynstraðir á aðalfundinum og vanta tí á myndini*

# Neyðugt at økja trygdina í Arktis

**Norðurlendsku maskinmeistarafeløgini taka undir við yvirlýsing hjá norðurlendsku Navigatørfeløgunum, sum millum annað snýr seg um betri sjóferðslutrygd í Arktis. Tað bleiv niðurstøðan hjá maskinmeistarafeløgunum eftir ein felags fund í heyst. Yvirlýsingin snýr seg millum annað um betri trygd í Arktis.**



*Samstarvið hjá norðurlendsku maskinmeistarafeløgunum, Nordiska Maskinbefälsfederationen, NMF, helt sín seinna hálvárliga fund í Svøríki í heyst*

*Mynd: NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen)*

Grækaris Djurhuus Magnussen - PRESS

Í eini yvirlýsing hjá norðurlendsku navigatørfeløgunum verður millum annað víst á, at millum 2013 og 2019 vaks skipaferðslan í Arktis 25 prosent, og samlaði teinurin, skip sigldu í hesum økinum, longdist við 75 prosentum sambært frágreiðing hjá WWF. Økta ferðslan saman við veðurlagsbroytingum og broyttum ísviðurskiftum er ein vaksandi trupulleiki fyri trygdina hjá bæði manningum og ferðafólki, sum sigla í arktiskum sjóøki.

Á sínum fundi í Stokkholm í Svøríki í heyst samtykti samstarvið millum tey norðurlendsku maskinmeistarafeløgini, Nordiska Maskinbefälsfederationen, NMF, at taka undir við yvirlýsingini hjá navigatørunum.

Í yvirlýsingini verður hildið, at núverandi geopolitiska støðan ørkymlar



framtíðar samstarvið millum arktisku tjóðirnar og tær avleiðingarnar, sum kunnu verða í sambandið við trygdina í økinum.

**Trygdarpolitikkur í miðdepilin**

Semja er um, at kikarin skal setast upp aftur meira á trygdarpolitikkin í Arktis, tí vandi er fyri, at samstarvið um rannsóknararbeiði, bjarging og skipaferðslu í økinum eins og umhvørvið kann fara at minka.

Norðurlendsku Navigatørfeløgini, The Nordic Navigators, sum altso er eitt samtak av navigatørfeløgum í Norðurlondum, stúra fyri trygdini í Arktis og vilja fegin arbeiða saman við stovnum, feløgum og øðrum, sum hava áhuga í at bøta um trygdina í økinum, og tað er millum annað hetta, sum norðurlendska maskinmeistarasamstarvið NMF eisini tekur undir við.

– Vit vilja arbeiða saman við øðrum maritimum áhugaðum um tilmæli, sum føra til batar, verður sagt.

Nordic Navigators mælir sjóvinnumyndugleikum í arktiskum tjóðum og flagglondum, sum sigla í Arktis, at bøta um sjóferðslutrygd á hesum økjum:

- Fyrst og fremst at seta tiknar avgerðir í verk.
- Pól-reglugerðin (The Polar Code) eigur at umfata heilt ávís amboð til eftirlit.
- Reglur og líknandi skulu haldast.
- At flaggstatir seta omanfyrinevnda í verk hjá einstøku tjóðunum.

Hildið verður eisini, at krøv til yvirlivilsisútgerð eiga at ítøkiliggerast, og tangaskip og reikferðaskip eiga at fáa loyvi at sigla á farleiðum í Arktis, sum vit vita eru siglandi hjá øðrum skipum.

Upplýst verður annars eisini, at í framtíðini verða allir limir í Arktiska Ráðnum limir í Nato – uttan Russland.

Les eisini á næstu síðu um vár-fundin hjá NMF í ár, sum var á Svalbard, og har trygd og umhvørvi við pólarnar aftur var ovast á breddanum.



*Umboðini hjá Maskinmeistarafelagnum á fundinum í Stokkholm. Úr vinstru eru tað Regin M. Olsen, næstformaður, Tummas Eli Høj Joensen, formaður, og Sjúrður Heinesen, skrivari*




# Tíðindaskriv frá norðurlendsku maskinmeistarafeløgunum

**Niðanfyri er enskmælta tíðindaskrivið endurgivið, sum NMF, samstarvið hjá norðurlendskum maskinmeistarafeløgum, sendi út eftir fundin í Stokkholm í heyst**

"The Nordic Engineer Officer Federation 15th Congress, 24.10 2022 in Stockholm have decided to support the Join Declaration of Intention by the Nordic Navigators on Improved Maritime Safety in the Arctic, with the following bullets point also approved by ITF MSC in October 2022, to ensure safety for all who have their work on board this type of ship operating in polar waters;

- Until it's mandatory in the Polar Code, all designated and assigned duties of persons who serve on this type of ship operating in polar waters, shall have adequate training and familiarization.

- In order to avoid criminalization of the Chief engineer and his engineer officers, it must be ensured that all technical equipment, especially environmental cleaning equipment, such as ballast water, cooling water, scrubbers, separators, Waste incinerators etc. is constructed and designed for operation in polar waters and approved and verified in accordance with MARPOL an/or other relevant regulations.

- Safety dynamics of ship's energy sources must be highlighted."

Undirskrivað hevur formaðurin í norska maskinmeistarafelagnum, Odd Rune Malterud.

*NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen) varð stovnað í 1919, og umboðar í dag 30.000 maskinmeistarar í Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi, Íslandi og í Føroyum.*

# NMF-fundur á Svalbard

**Pól-reglugerðin hjá IMO og umhvørvi og trygd í arktiska økinum vóru ovast á breddanum, tá norðurlendsku maskinmeistarafeløgini hittust á NMF-fundi í Longyearbýnum á Svalbard. Fundurin í heyst verður í Føroyum**



*Umboðini fyri norðurlendsku maskinmeistarafeløgini á NMF-fundi í Longyearbýnum á Svalbard*

*Mynd: NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen)*

Ingolf S. Olsen - PRESS

Ein tann fyrsta uppgávan, Arnfinn Bech fekk sum nýggjur formaður í Maskinmeistarafelagnum, var at fara heilt norður til Svalbard á fund hjá NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen), ið er meginfelagið hjá norðurlendskum maskinmeistarafeløgum.

Arnfinn Bech tók við sum formaður á aðalfundinum 11. mars, og NMF-fundurin var í døgunum 20. – 22. mars. Saman við honum á Svalbard var Sjúrður Heinesen, og var hetta hansara seinasta ferð í tænastuørindum fyri Maskinmeistarafelagið. Hann hevði sín seinasta arbeiðsdag á skrivstovuni 31. mars.

## Pól-umhvørvið á skrá

Høvuðsevnið á fundinum hesaferð var Pól-reglugerðin – The Polar Code – hjá IMO. Pól-reglugerðin hevur ásetingar um øll viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri sigling á havleiðunum við teir báðar pólarnar, tá tað ræður um trygd á sjónum, bjarging (search and rescue) og ikki minni um verju av serstaka pólumhvørvinum og vistskipanunum har.

Viðtøkur, mál og limaavtala hjá NMF blivu eisini umrødd á fundinum á Svalbard. Eisini var tosað um altjóða samstarv, og hvussu millumlanda samstørv kunnu styrkjast og mennast. Kjakast var eisini um rapporteringina ímillum limafeløgini í NMF, og hvussu hon kann betrast frameftir.

Almenna niðurstøðan av fundinum var, at nógv var komið á skaftið, og at fundurin gav limunum ein pall at skifta orð um hugskot, leggja lunnar undir nýggj samstørv og styrkja tey, sum longu eru

## Føroyar vertur

Talan var regluliga, hálvárliga fundin hjá NMF. Noreg var vertur hesa ferð, og avgerðin at halda fundin í Longyearbýnum á Svalbard mundi hava samband við, at Pól-reglugerðin var sett á skránna.

Luttakararnir fingu millum annað eisini høvi at vitja Norges Arktiske Universitet í Longyearbýnum.

Maskinmeistarafelagið er vertur fyri næsta regluliga fundinum hjá NMF, og hann verður í Føroyum í døgunum 9. – 10. oktober.










ROYN TÍNA VITAN Í VERULEIKA-KENDUM UMSTØÐUM

# TAK SKEIÐINI
# TÁ TÚ ERT HEIMA

## Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

## VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ECDIS-skeið
- GOC-skeið
- DP-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- SSO-skeið
- ERM-skeið
- Tecdis-skeið
- Heilsu-skeið
- ARPA-skeið
- Trygdar-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á
**www.skeid.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

SENDISTOVAN

# Nógvar royndir við grønari skipaferðslu

**Seinastu árini hevur CO2-útlát og onnur útlát verið frammarlaga í kjakinum, og ein rúgva av royndum verða støðugt gjørdar at finna reinari orku. Í 2021 var nógv skrivað um royndirnar at fáa eina grønari skipaferðslu, og júst skipaferðslan er ein partur av dálkingini. Her eru brot úr nøkrum greinum, sum viðgera møguleikarnar at fáa grønari motorar/maskinur til skipaferðsluna**

## CO2: Smíða skip fyri 10 milliardir dollarar – útlátsfrítt

**Japanska reiðarafelagið, JSA, stuðlar ætlanunum hjá stjórnini at minka CO2-útlátið til null áðrenn 2050. Reiðararnir eru samdir um at smíða skip fyri tíggju milliardir dollarar um árið fyri at røkka CO2-nullinum.**




*Japanar ætla at minka CO2-útlátið til null áðrenn 2050. (Modellmynd)*

*Mynd: Petur Skeel Dahl*

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Talan er um at gera hesar íløgurnar í nýggj skip við null-útláti næstu 30 árini.

Japanska reiðarafelagið sigur, at limirnir í felagnum síggja tríggjar høvuðsmøguleikar: Kolevnisendurnýtslumetan, vetni/hydrogen og ammoniakk.

Til tess at koma á mál við null-útlátinum í 2050 er neyðugt at smíða 100 skip árliga, og tað fer at kosta einar 100 milliardir dollarar um árið.

Reiðarafelagið í Japan metir, at neyðugt er bæði hjá skipum, sum sigla á heimshøvunum, og skipum, sum sigla fram við japonsku strondini, at vera við í hesi strembanini at endurnýggja flotan til ein reinari flota.

*Kelda: Tradewinds*

# ST: CO2-útlátið skal niður í helvt eftir átta árum

**Korona gav veðurlagnum ein stokkutan linna. CO2-kurvin má bankast niður nú, siga Danmarks Tekniske Universitet og Veðurlagsnevndin hjá ST.**



*CO2-útlátið skal niður í helvt eftir átta árum sambært París-sáttmálanum*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

– Um vit skulu liva upp til París-sáttmálan at avmarka alheims upphitingina við 1,5 stigum í ár 2100, skal vakstrarhúsútlátið minkast niður í helvt áðrenn 2030. Men leiðarar heimsins hava eftir øllum at døma ikki skilt álvaran í ávaringunum frá granskarum.

– Við verandi gongd og veðurlagslyftum frá alheims londum hava vit kós móti einari klótu, sum verður í minsta lagi 2,7 hitastig heitari í 2100. Tað kann føra til "tipping points", har einki tamarhald verður á veðurlagnum á jørðini yvirhøvur.

Tað sæst í frágreiðingini "The Heat Is On", sum António Guterres, ST-aðalskrivari, leggur fram.

– Veðurlagsbroytingar eru ikki longur ein framtíðartrupulleiki, tað er ein trupulleiki, sum vit hava beint nú, sigur Inger Andersen, aðalskrivari í Unep hjá DTU (Danmarks Tekniske Universitet).

Meira enn 100 lond hava sent dagførd veðurlagsmál inn til veðurlagstoppfundin COP26, sum verður í Glasgow í Skottlandi. Hesi veðurlagsmálini minka um samlaða útlátið við 7,5 prosentum til 2030, og tað er alt ov lítið. Neyðugt er at minka útlátið við í minsta lagi 55 prosentum fyri at røkka 1,5 hitastigum.

– Tað skal henda nakað heilt munandi við grønari orku, áðrenn 2030, nakað má koma inn í staðin fyri partar av kolaframleiðsluni, flutningur má ravmagniserast meira, og tað má vera meira orkuvirkni, sigur Anne Olhoff, sum er ætlanarleiðari hjá Unep á DTU.

*Kelda: Ritzau*



*Nýggjur brunnbátur minkar um brennievnisnýtsluna, og verjir soleiðis náttúruna (Modellmynd)*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

# Brunnbátur við 90 prosent minni útláti

**Í september 2021 varð nýggi brunnbáturin 'Færøysund' handaður av AAS Mekaniske Verksted AS til Førøya AS í Herøy. AAS hevur sniðgivið nýggja skipið, og talan er um týpuna AAS 3002 STDE-Hybrid**

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Brunnbáturin fór beint frá handanini til arbeiðis í einum longri sáttmála fyri Nova Sea AS og Salten Aqua AS og fleiri samstarvandi alarar.

Maritimt.com skrivar, at Færøysund er soleiðis útgjørdur, at hann lýkur strangastu umhvørviskrøvini.

Báturin hevur dieselelektriska framdráttarmegi og ESS-ravlaðsskipan til blendingsrakstur, eins og útgerð at binda í landstreymskipanir.

ESS-Ravlaðspakkin verður nýttur at taka spenningstopparnar undir rakstri fyri at minka um talið av generatorum í drift og soleiðis minka nógv um brennievnisnýtsluna. Báturin kann eisini liggja við bryggju í styttri og longri tíðarskeið uttan at nýta generatorar – alt eftir landstreymsorkuni í havnunum. Tað minkar eisini um larmin í økinum.

Báturin er sera væl útgjørdur til flutning av livandi fiski í opnari og afturlatnari skipan á ein varligan hátt, null útlát undir afturlatnum flutningi við yvirvaking, reinsing og viðgerð av øllum vatnrensli, filturskipan at reinsa vatn, UV-viðgerð av vatni inn og út úr lastarúmunum og so framvegis.

*Kelda: Maritimt.com*

# Heimsins fyrsta blendings-bulkskip

**NOAH og Hagland skriva ídnaðarsøgu við ravlaðsblendings-skipinum Hagland Captain. Talan er um eitt umvælt og umbygt bulkskip, sum fer at minka eiturútlát sum NOx við 90 prosentum, tað er tað sama sum útlátið frá 84.000 persónbilum**



*Umvælt bulkskip, sum verður heimsins fyrsta plugin-blendings-bulkskip, minkar um eiturútlát í náttúruna við 90 prosentum. (Modellmynd)*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

– Hetta er heimsins fyrsta "plugin" blendings bulkskip, og er eitt ógvuliga gott dømi um eina nýggja tøkni, sum er neyðug, til vit finna aðrar nullútlátsloysnir, segði táverandi norski forsætisráðharrin Erna Solberg, tá hon vitjaði skipið í havnini í Oslo.

Í 2018 vildi tilfeingis- og umhvørvisfelagið NOAH minka útlátini frá flutningsleiðum sínum. Felagið vendi sær til eina røð av reiðaríum og fekk eina langtíðar avtalu við Hagland Shipping, sum tryggjaði íløguna.

Fyri kortum kom veðurlagsnevndin hjá ST við einari skelkandi frágreiðing, sum av álvara lýsir, hvussu stutta tíð vit hava at minka munandi um veðurlagsútlátini.

- Hetta skipið er eitt lítið, men týdningarmikið stig á leiðini. Í dag skriva vit ein nýggjan tátt í stóru ídnaðarumleggingini í Noregi og í restini av heiminum, sigur samtaksstjórin í NOAH, Anders Lægreid.

*Kelda: Maritimt.com*

# Maersk fer at royna luftbløðrur

**Sum eina roynd á havinum fer A.P. Møller-Mærsk næsta ár at royna luftbløðrur undir einum bingjuskipi. Endamálið er at minka um sjógvmótstøðuna.**

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Tá ið skipið siglir á einum bløðru-teppi, sum verður blást út í einum jøvnum streymi undir skrokkimum, sparir tað brennievni og sostatt minkar $CO_2$-útlátið.

Tað er svenska fyritøkan Wärtsila, sum boðar frá hesum í einum tíðindaskrivi. Svenska fyritøkan upplýsir eisini, at bretska virkið 'Silverstream Technologies' skal gera skipanina.

Wärtsila skal seta skipanina í bingjuskipið, og sum skilst, bílegði Mærsk skipanina í mai í ár.

Seinni skrivaði *Søfart*, at Silverstream hevur fingið bíleggingar upp á 30 skipanir til nýbygningar frá Mærskkappingarneytanum Mediterranean Shipping (MSC).

*Kelda: Søfart*



***Maersk fer at royna at sigla við luftbløðrum at minka um sjógvmótstøðuna og sostatt at minka um brennievnisnýtsluna***

*Mynd: Petur Skeel Dahl*



*Ógvuliga lítið er at hoyra frá føroyskari síðu um royndir at minka um útlátið frá skipum. (Modellmynd)*

*Mynd: Petur Skeel Dahl*

# Lítið at síggja til føroysk átøk

**Lítið er at síggja til verulig grøn átøk frá politiskari síðu í Føroyum. Nomið verður eitt sindur við tað upp undir val, men so steðgar alt upp**

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Tí er tað at fegnast um, at Fróðskaparsetrið hevur tikið táttin upp.

Mikudagin hin 27. oktober 2021 var grønt orðaskifti á skránni. Fróðskaparsetrið skrivaði millum annað soleiðis á heimasíðuni:

"Útlátið má og skal minka, men hvussu skulu vit bera okkum at fyri at minka um størstu útlátskeldurnar, sum í Føroyum uttan samanbering eru skip og bátar?"

Hetta var høvuðsevnið á webinarinum á Fróðskaparsetrinum. Við á webinarinum vóru Desislavu Todorova, Jon Jordan, Kári Mortensen, Janus Thomsen, Anu Holden Peters og Richard Mortensen.

"Oljunýtslan skal minka mest møguligt fram til 2030, og helst skulu vit vera leys av olju í 2050. Og tí hevur tað skund og er neyðugt at finna onnur brennievni til okkara flutnings- og vinnufør á sjónum.

Fróðskaparsetrið er partur av eini Northern Periphery and Arcitic-verkætlan, nevnd "Hydrogen Utilisation and Green Energy", stytt HUGE. Aðrir luttakarar í verkætlanini eru universitet og felagsskapir í Írlandi, Norðurírlandi, Skotlandi, Finnlandi og Íslandi.

Nú, verkætlanarbólkurin hittist í Føroyum, varð skipað fyri almenna webinarinum, har evnið "null-útlátsskip" varð umrøtt, og hvørji krøv hetta setir til grønu orkuskipanirnar."

Sostatt eru Føroyar so smátt komnar við í veruliga kjakið um ein grønari heim. Og so hvørt sum heimurin verður grønari, fer arbeiðið hjá maskinmeistarum at broytast, millum annað tí at arbeitt fer at verða við øðrvísi og stundum nýggjum brennievnum. Og alt meira verður stýrt umvegis teldur og telduskermar.

Meira um evnið sæð frá føroyskari síðu seinni.

# Støðug útbygging av elnetinum

**Kravið um, at øll elnýtsla á landi skal vera grøn í 2030, krevur útbygging av elnetinum hjá SEV, men vanliga útbyggingin og vanligu íløgurnar verða nøktandi – eisini til nógv øktu streymnýtsluna – sigur Eirikur Norðberg, verkætlanarleiðari hjá SEV**

Orð og myndir:
Øssur Winthereig – PRESS

Í 2030 skal hvørt hús hava kvittað oljuna og lagt um til eitthvørt slag av orku, sum antin brúkar streym ella onkra aðra orkukeldu, sum ikki er olja. Bilarnir skulu standa í løðarum, so teir altíð eru klárir at koyra.

Hetta fer at økja nógv um streymnýtsluna, og málið er, at øll nýtslan er grøn. Allur streymurin skal flytast frá framleiðslueindunum og út til brúkararnar. Kaðlar liggja í hvørt hús og til hvørt virki i landinum, men á SEV stúra tey ikki fyri, at elnetið ikki klárar øktu streymnýtsluna.

– Tær vanligu útbyggingar, sum vit gera á netinum, fara eisini at nøkta tørvin í framtíðini, sigur Eirikur Norðberg, sum er verkætlanarleiðari á SEV.

Sjey ár eru til málið hjá SEV um, at øll orka á landi skal koma frá streymi og vera grøn, er rokkið. At orkan skal vera grøn merkir, at oljan sum høvuðskelda skal minka munandi.

Tá Maskinmeistarin vitjaði SEV ein kavadag, komu næstan 60 prosent av streyminum frá olju, 32 prosent frá vatnorku og 10 prosent frá vindorku.

Grøna orkuskiftið hjá SEV er at flyta framleiðsluna av streymi frá olju og yvir á aðrar orkukeldur.



*Koblingsstøðirnar – her í Havnadali – taka móti framleidda streyminum*

**Netið í jørðini**
Hetta orkuskiftið á landi krevur stórar íløgur, men sjálvt elnetið, sum í dag fyri tað mesta liggur grivið niðri í jørðini, skal eisini klára taka ímóti øktu nýtsluni.

Eirikur Norðberg fær ofta spurningin, um allir vegirnir nú skulu gravast upp, tí kaðlarnir í vegunum ikki fara at kunna flyta allan streymin, ið húsini skulu brúka til hitapumpur og til elbilarnarnar, sum fara at standa uttan fyri hvør hús.

– Verandi net til húskini klárar at føða hitapumpur til hvørt hús, tí hitapumpur brúka ikki so nógvan streym, og tær koyra nokk so forskotið. Spurningurin er, hvussu støðan hevði verið, um hvørt hús eisini skal hava sín egna løðara til elbilarnar, sigur Eirikur Norðberg.

Um øll koma heim klokkan fimm og seta bilarnar at løða í senn, so verður stór tyngd á netið, samstundis sum øll fara at gera døgurða, og hitapumpurnar koyra.

SEV letur sonevndar grønar málarar til tey, sum vilja hava løðara til elbilin við hús, men SEV setur sum treyt, at SEV stýrir, nær løðarin kann brúkast, so alt trýstið ikki liggur samstundis.

Flestu, sum hava elbil, biðja ein el-innleggjara seta løðistøð upp í bilhúsinum ella uttanfyri, og so letur SEV ein




*Eirikur Norðbrg, verkætlanarleiðari hjá SEV, inni á koblingsstøðini í Havnardali*

grønan málara, sum telur, tá bilurin stendur til. Og streymurin er so bíligari um náttina, ella tá nýtslan ikki er so høg. Sum er, er prísskipanin, at tann grøni málarin fær bíligari prís, men treytin fyri at fáa grøna málaran er, at SEV stýrir elbilaløðaranum.

Um løðarin verður tvingaður í gongd, so kostar streymurin vanligan prís.

Umframt elbilin, so verður streym-nýtslan til hitapumpurnar eisini mátað við grøna málaranum, men hitapumpan má koyra, tá brúk er fyri henni, tí eingin skal sita kaldur.

– Tað at stýra løðingini av elbilum hevur stóran týdning bæði fyri brúkaran og SEV, tí báðir partar spara útreiðslur. SEV sleppur undan at skula leggja sverari kaðlar í vegirnar og inn í húsini, og brúkarin fær bíligari streym, sigur Eirikur Norðberg.

## Tvær-tríggjar ferðir um vikuna

Eirikur Norðberg heldur, at tey flestu, sum hava elbil í Føroyum, nýtast ikki at løða bilin meira enn tvær-tríggjar ferðir um vikuna. Sjálvandi eru nøkur, sum koyra langar teinar, men tað eru tey fægstu.

– Tí skuldi tað hóska væl, at bilurin løðir um náttina og er klárur um morgunin. Tí elframleiðsan hjá SEV er umleið helvtina minni um náttina enn um dagin, sigur Eirikur Norðberg.

– Stórur eftirspurningurin er eftir grøna málaranum, men vit merkja ikki, at elnetið er undir nøkrum trýsti.

At SEV roynir at stýra, nær brúkarin skal løða, verður eisini nevnt flexnýtsla.




***Nýggjasta koblingsstøðin er á Húsareyni, sum skal taka móti streyminum frá nýggju myllulundunum***






*Nýggju transformatorarnir á støðini á Húsareyni krevja nógv minni pláss enn teir, sum enn verða brúktir á gomlu støðunum*

Tað vil siga, at roynt verður at fáa brúkaran at løða og brúka streym, tá kapasiteturin er har.

– Men vit brúkarar tíma illa at verða stýrd av øðrum. So hvussu ger mann tað best, so at fólk ikki skulu hava fleiri kontakir og stikkarar og málarar, sum skiftast skal í millum. Tað er ein av avbjóðingunum, sigur Eirikur Norðberg.

– Í dag eru vit sjálvandi ikki klár til tað, sum kemur í 2030. Fyrr ella seinni skal til dømis miðbýrurin í Havn gravast upp, tí eisini kaðlar blíva gamlir, men alt er ein tilgongd. Eg síggi ikki fyri mær tær ógvusligu útbbyggingarnar, har hvør gøta og hvør vegur í Havn ella Klaksvík skal gravast upp. Helst eru onkrir býlingar við gomlum kaðlum, sum skulu skiftast, men tørvur er ikki á tí ógvusligu útbyggingini, sigur hann.

## Sverir kaðlar eru motorvegurin

Koblingsstøðirnar kring landið eru fyrstu móttakararnir av framleiddu orkuni – eitt nú frá Sundsverkinum, Eiðisverkinum og Vestmanna og frá nýggju vindmyllulundunum.

Meginparturin av streyminum verður fluttur gjøgnum niðurgrivnar 60 kV kaðlar, men enn er ikki komið heilt á mál at flyta framleidda streymin úr luftbornu streymleidningunum niður í jørðina. 60 kV kaðlarnir eru motorvegurin í streymveitingini.

Á koblingsstøðunum verður streymurin transformereaður til 10 kV ella 20 kV, og kaðlar ganga til tað, sum tey á SEV kalla steinhúsini ella trafostøðirnar og haðani út í gráu elskápini, sum standa í øllum býlingum, og úr skápunum til eitt vanligt sethús verður lagdur ein 400 kV kaðal. Hvørt skáp hevur eina 35 A sikring til hvørt hús, so tað er streymurin, sum hvørt húsarhald kann brúka. Hetta svarar til 24 kW.

– Um tú gert døgurða, hitapumpan koyrir, og bilurin skal løðast, so er sannlíkt, at tað er ov lítið – og sikringin brestur. Tí er best at breiða nýtsluna út á alt samdøgrið, sigur Eirikur Norðberg.

## Íbindingargjald er bremsan

Eini vanlig hús gjalda íbindingargjald fyri 35 A, sum er nóg mikið til tey flestu. Men stór arbeiðspláss ella kanska kommunur skulu ofta brúka meira streym. Tá hækkar íbindingargjaldið samsvarandi, tí kanska skulu sverari kaðlar leggjast, ella nýggj elskáp setast upp.

– Vit kunnu siga, at íbindingargjaldið er eitt mát fyri, hvørjar eykaíløgur SEV skal gera, um eitt hús, eitt virki ella ein kommuna skal brúka meira streym enn eini vanlig hús, sigur Eirikur Norðberg. Íbindingargjaldið er eisini mátin, sum fær okkum at hugsa okkum um, hvussu nógvan streym vit halda, at vit hava brúka fyri.

At hvørt húski og hvørt virki biður um tann streym, sum tey vænta at brúka, ger, at SEV ikki ger óneyðugar íløgur, tí íløgurnar mugu gerast eftir, hvussu nógv væntaði eftirspurningurin er í einum øki. Ìbindargjaldið er samstundis eitt mát fyri, hvussu stór nýtslan fer at vera.

## Vanlig útbygging er nøktandi

Eirikur Norðberg sigur, at tær útbyggingar, sum krevjast fyri at nøkta tørvin, sum fylgir við grøna orkuskiftinum, eru partur av vanligu útbyggingini, sum verður gjørd, tá nýtslan økist onkrastaðni, ella aðrar útbyggingar krevja tað.

– Seinastu seks-átta árini eru næstan allar útbyggingar, sum eg havi verið við til, verið gjørdar, tí nýtslan kring landið er vaksin so nógv, sigur Eirikur Norðberg. Serliga alararnir, sum hava fiskin longri og longri á landi, brúka meira streym enn fyrr.

– Men tá vit gera tær úbyggingarnar, so mugu vit eisini hugsa, hvar vit kunnu vænta, at til dømis vindmyllur

verða settar upp. Vit royna at hygga í glaskúluna, men kunnu bara gera eftir førimuni, sigur Eirikur Norðberg.

## Elbilar og smoltstøðir

Eirikur Norðberg heldur, at verandi net hevði klárað nógvar elbilar, men hann vísir á, at tað eru stóru verkætlanirnar, sum til dømis smoltstøðir og virkir, sum veruliga gera mun, tá nýggjar íløgur skulu gerast í kaðlar ella koblingsstøðir.

Upprunaligu framskrivingarnar hjá SEV vístu, at í 2030 fór kravið til streymframleiðsluna at vera 420 GWh, men nú, tá bæði húsini og bilarnir eisini skulu liva av streymi í 2030, so væntar SEV, at streymnýtslan verður einar 600 GWh. Í dag er samlaða nýtslan á landi umleið 400 GWh. GWh (gigawatttímar) er eitt mát fyri, hvussu nógvur streymur verður framleiddur ella brúktur, meðan GW (gigawatt) er mátið fyri máttin av streyminum. Til dømis verður sagt í wattum, hvør máttur skal til at tenda og koyra eitt kuldaskáp, men mongdin av streymi verður mátað í máttinum falda við, hvussu nógvar tímar kuldaskápið er tendrað.

## Dagføra í jørðini

– Útbyggingin er eitt áhaldandi arbeiði. Til dømis er nógvur útgrevstur í Havn, og har fylgja vit við og meta saman við kommununi um, hvat nýtt skal leggjast, ella hvat skal dagførast, sigur Eirikur Norðberg. Hetta er eitt samstarv, tí kommunurnar hava sjálvandi eisini áhuga í at sleppa undan, at ein gravar nú, og ein annar fer at grava sama strekkið árið eftir.

- Sum tað er nú, so er einki, sum týðir upp á, at vit fara at standa í trongari støðu við undirstøðukervinum, tá 2030 nærkast. Sjálvandi skal SEV eisini í gongd við egnan útgrevstur av og á, men útbygginin er eitt øgiliga samansett arbeiði, sigur Eirikur Norðberg.

## Vindmyllurnar krevja

Í 2014 vórðu fyrstu myllurnar settar upp í Húsahaganum, og var ein stór nýggj koblingsstøð bygd á Húsareyni, og um sama mundið var ein koblingsstøð bygd í Runavík, tí nýtslan á Skálafjørðinum var vaksin so nógv. Eitt nú skuldi nógvur streymur til nýggja virkið hjá Bakkafrost á Glyvrum.

Nýggju koblingstøðirnar verða oftast bygdar, sum ein kombinasjón av, at nýggjar vindmyllur verða settar upp, og streymnýtslan veksur í sama øki.

Í rundum tølum brúkar ein smoltstøð kanska 20 ferðir so nógvan streym sum ein býlingur við 150 húsum við bæði hitapumpum og elbilum uttan fyri hvørt hús.

So stóru krøvini til elnetið verða nógv stýrd av, hvørjar stórar útbyggingar fara fram.

## Gjøgnum tunlarnar

Undirsjóvartunlarnir hava eisini gjørt, at sloppið er av við nógvar av luftbornu kaðlunum. At streymnýtslan er vaksin nógv, sæst til dømis við, at tá Vágatunnilin lat upp í 2002, var ikki mett, at neyðugt var við einum 60 kV kaðli vestur í Vágar, men nú er tørvurin har.

– Tað vísir, at alt hendir øgiliga skjótt. Serliga alingin á landi verður nógv útbygd og krevur nógva orku, sigur Eirikur Norðberg.

Fyri bara fáum árum síðani var ikki hildið, at tørvurin í Hvannasundi fór at blíva so stórur, Men nú, tá tunlarnir Norður um Fjall er gjørdir, mugu fleiri kaðlar leggjast tann vegin til smoltstøðina norðanfyri.

Eitt annað dømi um stóra útbbygging var, tá Varðin bygdi virkið á Tvøroyri.

– Har var tað skyldan hjá SEV at framleiða nóg mikið av streymi til tað virkið. SEV hevur lógarásetta skyldu at veita øllum streym altíð – støðugan, bíligan og grønan streym, sigur Eirikur Norðberg.






*Enn eru nakrir fáir luftbornir kaðlar eftir, men meginparturin av kaðlunum eru niðurgrivnir. Støðin við Varðagøtu í Havn er høvuðsmóttakarin av streymi til høvuðsstaðin*

# Regin afturvaldur

**Regin Olsen var fyrstu ferð valdur í nevndina í Maskinmeistarafelagnum í 2001, og er nú farin undir sítt 12. valskeið**

Ingolf S. Olsen - PRESS

Á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum bleiv Regin Olsen afturvaldur í nevndina, og var hetta ikki minni enn 12. ferðin, at hann stillaði upp og varð valdur. Fyrstu ferð var í 2001, so hann hevur havt sæti í nevndini í 22 ár – og 24 ár, tá hetta nýggja skeiðið hjá honum er úti.

Í 2007, tá Páll Hansen, ið hevði verið næstformaður, bleiv formaður, valdi nevndin Regin Olsen til næstformann. Tað hevur hann verið síðan – eisini í nýggju nevndini, sum hevur skipað seg.

## Virðismiklar royndir

Drúgvu royndirnar hjá honum í nevndini og sum næstformaður eru virðismiklar og tað serliga, nú rættiliga stór útskifting hevur verið í nevndini hesar seinastu aðalfundirnar. Ongin av hinum nevndarlimunum hevur sostatt meira enn eitt ár á baki í nýggju nevndini.

Regin Olsen dróg annars leingi á bæði, um hann yvirhøvur skuldi stilla upp aftur hesa ferð.

– Nú bleiv alt eitt sindur undarligt við tað, at Ólavur Gunnarsson fór frá sum formaður í ótíð í fjør, og tá Tummas Eli bara hevði stillað upp til formanssessin, kundi tað hent, at øll í nevndini vóru nýggj ella næstan nýggj, tá avtornaði. Tað hevði verið óheppið, helt eg, tí vit standa á gáttini til eina rúgvu av sáttmálasamráðingum. Alt hetta gjørdi tað lættari at taka avgerðina um at stilla uppaftur, greiðir Regin Olsen frá.

## Einsamallur í 38 ár

Sum næstformaður stóð tað honum í boði at gerast formaður, tá Ólavur Gunnarsson fór frá 1. september í fjør, men hann bar seg undan – í fyrsta lagi, tí hann vildi taka atlit at sínum arbeiðsplássi, Klaksvíkar Sjúkrahúsi, har hann er deildarleiðari á Maskindeildini, og í øðrum lagi, tí hann við egnum orðum trívist betur sum nummar tvey enn sum nummar eitt.

– Eg havi verið maskinmeistari á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í meira enn 38 ár, og til í fjør heyst hevði eg verið einsamallur. Tá var tað loksins komið har til, at eg skuldi fáa ein mann afturat mær, og tað fall saman við formansskiftinum í Maskinmeistarafelagnum. Eg helt tí, at tað vildi verið øgiliga keðiligt av mær at farið frá ella í farloyvi úr mínum arbeiði júst tá. Eg kundi kanska havt tikið við sum formaður í felagnum fram til aðalfundin nú, men eg tosaði við Tummas Eli, og tá hann var sinnaður at taka yvir sum formaður, so var tað nógv tann besta loysnin fyri meg, sigur Regin Olsen.

## Trívist sum nummar tvey

Á Maskindeildini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevði hann, sum nevnt, rátt einsamallur í meira enn 38 ár, men tá tað kemur til nevndararbeiði og sovorðið hevur hann við egnum orðum altíð hildið seg verið betur egnaðan at vera nummar tvey enn nummar eitt.

– Gaman í havi eg verið næstformaður í 16 ár, og tað hevur mær dámt stak væl. Eg havi tó ongantíð havt ambisjónir um at blíva formaður og havi tí ongantíð stillað upp til tann sessin heldur. Men eg haldi, at tað er gott fyri ein formann at hava ein trúgvan og álítandi næstformann, og tann leikluturin passar nógv betur til mín, sigur Regin Olsen.



*Tó at Regin Olsen hevur verið næstformaður í Maskinmeistarafelagnum í 16 ár, hevur hann ongantíð havt ambisjónir um at blíva formaður. - Men tað er gott fyri ein formann at hava ein trúgvan og álítandi næstformann, og tann leikluturin passar nógv betur til mín, sigur hann*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

## Praktiskt arbeiðsbýti

Í nevndini hevur Regin Olsen SEV og IRF sum málsøki, men tað er ongin forðing fyri, at hansara royndir kunnu brúkast á øllum økjum.

- Vit hava allir okkara serligu málsøki sum ábyrgdarøki, men tað er tó bara eitt praktiskt arbeiðsbýti, tá vit tosa um málsøki upp á handa mátan, tí í øllum avgerðum og í eitt nú sáttmálasamráðingum arbeiðir nevndin saman um øll øki, sigur hann.

Regin Olsen er 64 ár, svínoyingur, men búsitandi í Klaksvík.

www.mest.fo
MEST
SHIPYARD

# EYKALUTIR

## 24/7 TÆNASTA – RING +298 79 11 00


Lætt at bíleggja umvegis telefon ella teldupost


24/7 tænasta


Størsta og besta goymsla í landinum



Sølubúð/goymsla í Havn, Runavík og á Skála


Vit koyra kring alt landið


Álítandi tænasta

MEST P/F · J.C. Svabosgøta 31 · P.O. BOX 65 · FO-110 Tórshavn · tel: +298 301100 · sales@mest.fo

# TRYGDINA FYRST

Tá alt kemur til alt snýr tað seg um trygd. Trygd hjá manning, ferðandi, farmi og skipi. Havið er eitt vandamikið arbeiðspláss, men óhapp henda eisini inni við land.

Lat okkum minka um vandarnar og venja okkum við regluliga at eftirkanna og brúka trygdarútgerð og bjargingarútgerð umborð.

Sjóvinnustýrið skipar og umsitur galdandi lógir og reglur á økinum. Vit leiðbeina fegin um ivamál eru.

Tá óhapp hendir umborð á føroyskum skipi, skal skiparin ella reiðarin boða Sjóvinnustýrinum frá hesum skjótast til ber.

**Vakttelefonin hevur (+298) 33 31 98**

www.fma.fo / fma@fma.fo / (+298) 35 56 00



SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Mortan er nýggjur í nevndini

**Tað eru serliga ynski um batar í korum og umstøðum hjá maskinmeistarunum á sjónum, sum fingu Mortan Sólheim Thomsen at bjóða seg fram til nevndina í Maskinmeistarafelagnum. Hann bleiv valdur, og hevur fingið Handilsskip, FAS og FMU sum ábyrgdarøki**

Ingolf S. Olsen - PRESS

Mortan Sólheim Thomsen er nýggjur í nevndini hjá Maskinmeistarafelagnum. Hann er 46 ár, ættaður úr Fuglafirði og búsitandi í Klaksvík, og hann siglir sum maskinstjóri á Mykinesi hjá Smyril Line.

Tað eru serliga kor og umstøður hjá maskinmeistarunum á sjónum, bæði í fiskiflotanum og í handilsflotanum, sum liggja honum á hjarta í fakfelagshøpi, og tað er hugurin at bøta um viðurskiftini á hesum økjunum, sum skundaði undir avgerðina at stilla upp.

Nýggi nevndarlimurin hevur ikki aftrað seg við at koma við hvøssum viðmerkingum og atfinningum um samfelagsviðurskifti og eisini fakfelagsviðurskifti í almenna rúminum. Alt hetta stendur hann við, men leggur samstundis dent á, at sum fakfelagsnevnd er tað umráðandi at arbeiða saman og standa sum eitt lið.



*Mortan Sólheim Thomsen, nýggjur nevndarlimur og maskinstjóri á Mykinesi hjá Smyriul Line. Hann leggur dent á, at langa útbúgvingartíðin rættvísger betri hýrur til maskinmeistararnar á sjónum, tí ein maskinmeistari hevur oftast tikið onkra hondverkaraútbúgving áðrenn maskinskúlan og skal síðan sigla í fleiri ár fyri at fáa fulltteknað vinnubræv. - Sostatt hevur hann tá verið undir útbúgving í tilsamans 13 ár, og tað má og skal síggjast betur aftur í býtispartinum, sigur Mortan Sólheim Thomsen*

*Mynd: Privatmynd*

– Eg veit væl, at tað altíð er lætt at hava avgjørd sjónarmið í messuni ella kantinuni, og at veruleikin ofta sær øðrvísi út úr einum nevndarsessi. Tú skalt standa við tína sannføring, men tú kanst ikki bara royna at trumla títt egna ígjøgnum, tí so stendur tú einsamallur og fært onki ígjøgnum.

– Eg stillaði upp, tí eg haldi, at Maskinmeistarafelagið í størri mun hevur brúk fyri at vera umboðað av fólki, sum eru aktiv í sjóvinnuni, og tískil kenna betur til umstøðurnar har. Nú stendur eitt sindur betur til, men onkuntíð hava arbeiðsplássini á sjónum als ikki verið beinleiðis umboðað í nevndini í Maskinmeistarafelagnum.

– Handilsflotin hevur hesi seinastu 10 árini verið tann skjótast vaksandi parturin í føroyska flotanum, og eg veit, at hetta er ikki minst føroyskum maskinmeistarum fyri at takka, tí tað er teirra vitan og ídni, sum hevur verið við til gjørt hetta møguligt. Og tí eigur hetta sjálvandi eisini at avspeglast betri í hýruni, enn tað verður nú, sigur Mortan Sólheim Thomsen.

## Lang útbúgving

Eisini í fiskiflotanum heldur hann, at rúm er fyri bata. Eitt nú heldur nýggi

nevndarlimurin, at maskinmenn í fiskiflotanum hava uppiborið at fáa hægri býtispart, tí leiðin til hýru hjá teimum er bæði long og strævin.

– Ein maskinmeistari er oftast fyrst hondverkari av onkrum slag, og tað merkir, at hann hevur verið lærlingur í fýra ár og síðan gingið á maskinmeistaraskúla í trý ár, bara fyri at verða kandidatur til eitt maskinrúm. Síðan skal hann verða á sjónum í trý ár, áðrenn hann hevur fingið fult vinnubræv, og trý ár í effektivari tíð á sjónum taka seks ár at vinna inn. Sostatt hevur hann tá verið undir útbúgving í tilsamans 13 ár, og tað má og skal síggjast betur aftur í býtispartinum, sigur Mortan Sólheim Thomsen.

– Langa útbúgvingartíðin er sjálvandi eisini eitt grundleggjandi argument fyri betri lønarsømdum generelt hjá maskinmeistaranum, altso eisini hjá teimum í handilsflotanum og á landi, leggur hann afturat.

Mortan Sólheim Thomsen heldur, at maskinmenn í fiskiflotanum eiga at fáa eina garantihýru, sum í minsta lagi er tað sama sum ein tilsvarandi maskinmeistarahýra eftir FAS-sáttmálanum, sama hvønn skipabólk talan er um.

### Fleiri hjartamál

Millum onnur hjartamál ætlar hann eisini at virka fyri, at tað onkursvegna gerst lættari hjá maskinmeistarum uttanlands at verða limir í Maskinmeistarafelagnum, og hann hevur eisini sum mál, at sjómenn í FAS ikki skulu rinda toppskatt, um teir arbeiða, tá teir eru heima.

– Teir hoyra til eina skattaskipan, nevniliga FAS, og eiga tí at gjalda tað sama í skatti, tá teir arbeiða millum túrarnar, sum teir gera í FAS. Hetta vil ikki bert gagna maskinmeistarunum, men øllum samfelagnum, tí tað er altíð trot á maskinfólki í vinnuni á landi. Sum støðan er nú, kunnu upp í 75 prosent fara av lønini í skatti og avgjøldum, um ein maskinmeistari í FAS tekur arbeiði heima millum túrar, og tá eru tað sjálvandi nógvir, sum aftra seg, sigur Mortan Sólheim Thomsen.

Eitt viðkvæmt evni í hesum døgum, eisini í fakfelagshøpi, eru viðurskiftini við Russland, men Mortan Sólheim Thomsen er avgjørdur um, at føroysku avtalurnar í Barentshavinum undir ongum umstøðum eiga at merkjast av krígnum í Ukraina.

- Her skal Maskinmeistarafelagið sjálvandi eisini verja sínar limir, sum fiska í Barentshavinum, og felagið eigur at gera mynduleikunum greitt, at tað fær avleiðingar, um russlandssáttmálin verður vrakaður, tí kríggj og handil eiga ikki at samantvinnast, sigur hann.

Tá nevndin í Maskinmeistarafelagnum skipaði seg á sínum fyrsta fundi, fekk Mortan Sólheim Thomsen handilsskip, FAS (Føroya Altjóða Skipaskráseting) og FMU (Faroese Maritime Union) sum ábyrgdarøki.


Tá ið tú byggir egnan bústað

Áðrenn tú fert undir at byggja nýggjan bústað, er neyðugt at útvega tær fyribilsstreym. Fyribilsstreymurin skal brúkast, inntil húsini eru klár at flyta inn í, og vanligur streymur kann nýtast. Set teg í samband við løggildan elinnleggjara fyri at fáa fyribilsstreym.



Góð ráð

Les málaran av javnan fyri at tryggja teg móti óvæntaðum útreiðslum.

Ráðfør teg við elinnleggjaran beinanvegin, um tú umhugsar hitapumpu, elbil ella aðrar grønar loysnir.

Byggistreymurin skal bara brúkast í byggitíðini.

Fá fleiri góð ráð um fyribilsstreym og bygging á sev.fo

# Sjúrður bleiv fagnaður

**Sjúrður Heinesen fekk skil á umsitingina í Maskinmeistarafelagnum, tá hann tók við sum skrivstovuleiðari fyri 24 árum síðan. Hetta takkaði felagið honum fyri á lítlari fráfaringarsamkomu**

Orð: Ingolf S. Olsen - PRESS
Myndir: Maskinmeistarafelagið



Næsta ár kundi Sjúrður Heinesen havt hátíðarhildið sín 25 ára starvsdag í Maskinmeistarafelagnum, men hann leggur ikki so nógv í merkisdagar og enn minni, at hóvasták verður gjørt burtur úr sær sjálvum.

Tí gjørdi hann tíðliga á árinum av at gevast sum skrivstovuleiðari eftir aðalfundin í ár, tí sjónin nú er vorðin so vánalig, at hann við egnum orðum illa fær arbeitt.

31. marts hevði hann sín seinasta arbeiðsdag, og tá bleiv hann fagnaður á lítlari samkomu í felagshúsinum við Grønlandsvegin og við einum betri bita á matstovu aftaná.

Við á samkomuni vóru nevnd og tey, sum húsast í felagshúsinum – umframt umsitingina hjá Maskinmeistarafelagnum, hevur Krabbameinsfelagið eisini høli og skrivstovuhald í húsunum hjá Maskinmeistarafelagnum.

**Vøkur orð og gávur**
Á samkomuni fekk Sjúrður gávur og nógv vøkur orð við sær á ferðini út í pensjónstilveruna.

Hann fekk eisini nógv rósandi orð á aðalfundinum hjá Maskinmeistara-

*Sum takk fyri trúgva tænastu og eitt minni um drúgvu tíðina á skrivstovuni hjá Maskinmeistarafelagnum fekk Sjúrður Heinesen ein vakran málning av Nólsoynni, har hann hevur ættarbond, og sum er honum so kær. Tað er listamálarin Pól Skarðenni, ið hevur málað*

felagnum í mars og æruna fyri í síni tíð at hava fingið skil á felagnum og skrivstovurakstrinum.

Har greiddi hann eisini sjálvur eitt sindur frá tí fyrstu tíðini, tá upptakið var stórt, og tað mesta lá á sær.

Tá hann byrjaði á skrivstovuni í 1999, skipaði nevndin seg sjálv við formanni og hon var ikki beinleiðis partur av umsitingini. Seinni bleiv formaðurin tó beinleiðis valdur, men formanssessurin varð í fyrstani bara roknaður sum hálvtíðarstarv. Ikki fyrr enn í 2012 bleiv formaðurin fulltíðarsettur og fastur partur av skrivstovumanningini hjá Maskinmeistarafelagnum.

Sjúrður Heinesen fylti 67 í september, so fyri aldur kundi hann lata seg pensjonera við góðari samvitsku. Men hann er væl fyri og dámdi væl sítt arbeiði, so var tað ikki fyri støðugt versnandi eyguni, hevði hann fegin hildið fram í starvinum í nøkur ár afturat.

Tó at hann formliga hevur havt sín seinasta starvsdag, so hevur Sjúrður Heinesen lovað at vera tøkur hjá Maskinmeistarafelagnum í eina tíð, um tørvur onkuntíð er á hansara vitan og royndum.



*Tó at tað er við sorgblídni, at hann sigur Maskinmeistarafelagnum farvæl eftir 24 ár sum skrivstovuleiðari, so kundu tey mongu rósandi og vermandi orðini ikki annað enn fáa tað stóra brosið fram hjá Sjúrði*

*Regin Olsen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum, heldur málningin upp, so Sjúrður betur kann síggja hann. Framman fyri eru tað nýggi nevndarlimurin Mortan Sólheim Thomsen og Arnfinn Bech, formaður*



# Finnur er nýggjur skrivstovuleiðari

**Førleikarnir og royndirnar hjá Finni Joensen fevna víða, og hann er eitt nú ein framúr kokkur. Fakfelagsumsiting hevur hann tó ikki roynt áður, men hann er spentur uppá avbjóðingina og gleðir seg at smoyggja upp um armar**



*Báðir eru teir nýggir á skrivstovuni hjá Maskinmeistarafelagnum, Arnfinn Bech, felagsformaður, og Finnur Joensen, skrivstovuleiðari. Hóast teir fáa úr at gera við sáttmálasamráðingum í næstum, so ætla teir eisini at finna sær stundir til í felag at fara út at vitja arbeiðspláss, har maskinmeistarar starvast*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Ingolf S. Olsen - PRESS

Maður kemur í mans stað, sigur orðatakið, og tó at tað sjálvsagt ikki ber til at pota 24 ára royndir og vitan hjá undanfarna skrivstovuleiðara inn í eitt nýtt fólk, so er Arnfinn Bech, formaður í Maskinmeistarafelagnum, vísur í, at felagið í Finni Joensen hevur funnið júst tað rætta fólkið at taka við starvinum sum umsitingarleiðari.

- Tað var akkurát einum sovorðnum profili, vit leitaðu eftir – ein, sum hevur førleikar og royndir at ráðgeva breitt og ikki minni evni og førleikar at ráðgeva og vegleiða limirnar í øllum teirra viðurskiftum, sigur formaðurin.

**Hollar royndir**

Finnur Joensen er úr Havn, 51 ára gamal og hann fevnir ógvuliga víða, tá tað ræður um førleikar og royndir frá bæði tí almenna og tí privata arbeiðsmarknaðinum og hevur eisini royndir frá fakfelagsarbeiði.

Handalagið er gott, tí sum blaðungur lærdi hann til timburmann og smíðaði hús, áðrenn hann í seinnu helvt av 1990'árunum fór til Danmarkar at útbúgva seg til sosialráðgeva.

Sum sosialráðgevi arbeiddi hann eitt nú í fleiri ár sum samskipari hjá táverandi Nærverkinum, fyrst á forsorgar- og pensjónsøkinum og síðan sum samskipari.

Hann sat eisini í nevndini í Sosialráðgevarafelag Føroya, bæði sum vanligur nevndarlimur og sum kassameistari og umboðaði eitt skifti felagið í norðurlendskum samstarvi.

Útbúgvingarleiðin steðgaði tó ikki har. Finnur Joensen fekk áhuga fyri fyrisiting, og í 2009 fór hann at lesa á Roskilde Universitetscenter, haðani

hann í 2012 tók prógv sum cand.scient. adm í fyrisiting.

Heimafturkomin starvaðist hann sum ráðgevi í Almannamálaráðnum eitt stutt tíðarskeið og arbeiddi so sum ráðgevi og fyrisitari hjá Arbeiðsloysisskipanini, ALS, í eitt ár.

Í november 2016 fór Finnur Joensen í starv sum HR- og fyrisitingarleiðari hjá stórari byggifyritøku í Føroyum og arbeiddi har í stívliga fimm ár.

## Góður kokkur

Ferðin upp eftir útbúgvingarstiganum og akademiska prógvið hava tó ongantíð stygt hann frá kropsligum arbeiði ella gjørt hann bangnan fyri at dálka fingrarnar. Í tíðarbilum millum tey nevndu størvini hevur hann tískil gjørt ymiskt fyrifallandi arbeiði, bæði sum rágevi, timburmaður og sum kokkur. Á tí økinum er hann sjálvlærdur, men sambært góðum keldum, eru evnini so góð, at gravgangur er eftir at fáa hann sum kokk – bæði á landi og sjógvi.

Hann hevði ongantíð verið til skips, men júst góðu gávurnar at matgera gjørdu, at hann í vár eisini kundi seta flugubein við sjólívið í lívsrenslinum, tí tá hann sókti og fekk starvið sum skrivstovuleiðari, var hann farin at sigla sum kokkur við trolaranum Rankanum.

Finnur Joensen er spentur at fara til verka í sínum nýggja starvi.

– Eg eri byrjaður, beint sum felagið stendur fyri at skula í eldin við sáttmálasamráðingum, men eg gleði meg at smoyggja upp um armar. Formaðurin er eisini nýggjur í sínum starvi, og ætlanin er, at vit báðir eisini geva okkum stundir at fara út at heilsa uppá á arbeiðsplássum, har maskinmeistarar starvast. Tann parturin – tað beinleiðis sambandið við limirnar – skal ongantíð undirmetast, sigur Finnur Joensen.

17 umsøkjarar vóru til starvið sum skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum.



*– Eg gleði meg at smoyggja upp um armar, sigur Finnur Joensen, nýggjur skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Tríggjar prógvhandanir

**Tummas Eli Høj Joensen, táverandi formaður í Maskinmeistarafelagnum, helt røðu, tá prógvhandan og stór samkoma var á Vinnuháskúlanum 18. januar. Hann hugleiddi millum annað um maskinmeistarafakið, tess nógvu møguleikar og stóra gravgangin eftir maskinmeistarum allastaðni í dagsins samfelag. Samstundis heitti hann inniliga á nýútbúnu maskinmeistararnar um ongantíð at gloyma teirra fakfelag, ið eigur æruna av, at teir koma til skipað viðurskifti, tá teir nú fara út á arbeiðsmarknaðin**



*18. januar fingu 12 maskinmeistarar prógv: Bjartur Dánjalsson Thomsen, Daniel Friang Obradovic, Eyðálvur í Dávastovu, Jógvan Eli Fagraklett, Kristian Danbjørg Heinesen, Magnar Andersen Hentze, Ólavur Birgisson Jakobsen, Annika Wolles Ljósheim, Hergar Torbjarnarson Hansen, Mathias Müller, Kristian Sebastian Poulsen og Pætur Midjord. Virðisløn fyri hægstu próvtøl: Annika Wolles Ljósheim, grindaknív frá SEV; Hergar Torbjarnarson Hansen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum; Daniel Friang Obradovic, kikara frá Norðoya Sparikassa. Ídnisvirðisløn: Magnar Andersen Hentze, ur frá A. P. Møller*

*Mynd: Joan B. Poulsen, Vinnuháskúlin*

Ingolf S. Olsen - PRESS

Síðan blaðið kom út seinast, hava 18 nýggir maskinmeistarar lokið prógv á Vinnuháskúlanum.

Stóra, regluliga vetrarprógvhandanin var sum vant stutt eftir nýggjár – í ár var tað 18. januar – og tá fingu 12 maskinmeistarar, 10 skiparar og tveir skipsførarar prógv. Fýra maskinmeistarar fingu eisini prógv 16. september í fjør, og tveir 15. februar í ár.

Skálin í Vinnuháskúlanum var sum vant fullsettur á stóru próvtøkusamkomuni í januar.

Tá fekk Tummas Eli Høj Joensen, táverandi formaður í Maskinmeistarafelagnum, eisini høvi at halda røðu og geva nýggju maskinmeistarunum nøkur góð orð við á lívsleiðini.

Hann greiddi frá at hann akkurát visti, hvussu seinasta próvtøkutíðin hevði verið við fyrireiking til langt út á kvøldarnar og kanska næturnar við og nógvum spenningi. Og so tann stóri lættin, tá tann seinasta munnliga próvtøkan var staðin, og sloppið var. Alt hetta kundi Tummas Eli Høj Joensen liva seg inn í, greiddi hann frá, tí hann tók sjálvur prógv sum maskinmeistari í 1989, fyri nøkrum árum síðan gjørdi eldri sonurin tað sama, og nú lesur tann yngri sonurin eisini til maskinmeistara á Vinnuháskúlanum.

### Nógvir møguleikar

Formaðurin hugleiddi síðan um maskinmeistaraútbúgvingina, sum er

millum hægstu útbúgvingarnar, ið tað ber til at taka í Føroyum, og nógvu starvsmøguleikarnar, ið maskinmeistaraprógvið gevur bæði á sjógvi og landi.

– Nógvir eru møguleikarnir, men eitt er vist, at fert tú út at sigla, er tað lætt at blíva fíggjarliga væl fyri uppá stutta tíð. Størvini á landi eru eisini góð og geva væl, men eftir mínari meting vantar eitt sindur í, til vit hava rokkið lønarstøðinum hjá maskinmeistarunum í grannalondunum. Hetta er batnað eitt sindur og má betrast enn meira, segði Tummas Eli Høj Joensen.

## Felagið eigur æruna

Í hesum sambandi heitti hann so inniliga á nýggju maskinmeistararnar um ikki at gloyma fakfelagið, tá teir nú fóru út á arbeiðsmarknaðin.

– Tað er alneyðugt, at tit stuðla Maskinmeistarafelagnum, tí tað er als ikki ein sjálvfylgja, at tit koma út á ein arbeiðsmarknað við væl skipaðum viðurskiftum, til dømis væl skipaðum setanarviðurskiftum og tryggingum. At hetta er so, hevur tykkara fakfelag æruna av. Men er felag tykkara ikki eitt sterkt felag, tá kunnu tit fara at missa tað, sum longu er vunnið, og tað verður trupult at fremja batar. So enn einaferð, minnist til fakfelagið hjá tykkum, segði hann og minti eisini á, at limir altíð eru vælkomnir at seta seg í samband við Maskinmeistarafelagið um onkrir ivaspurningar eru, ella kanska koma á gátt til ein kaffimunn og eitt prát.

## Vitan frá lágum og høgum

Tummas Eli Høj Joensen hevði ikki bara fakfelagslig, men eisini reint faklig ráð at geva nýútbúnu maskinmeistarunum.

– Tá tit nú koma út á arbeiðsmarknaðin, súgvið so vitanina til tykkum, og



*Tummas Eli Høj Joensen, táverandi formaður í Maskinmeistarafelagnum, helt røðu við prógvhandanina 18. januar, og hann heitti inniliga á nýútbúnu maskinmeistararnar um ongantíð at gloyma fakfelag teirra*

*Mynd: Joan B. Poulsen, Vinnuháskúlin*



*Skálin var fullsettur á samkomuni í sambandi við prógvhandanina 18. januar. Uttast í fremsta rað situr Símun Poulsen, stjóri á Vinnuháskúlanum*

*Mynd: Joan B. Poulsen, Vinnuháskúlin*

minnist til, at tað sjáldan bara er ein máti at loysa ein trupulleika uppá. Verið tí nærlagdir, sýni eldhuga og nemið tykkum vitan frá bæði hægri og lægri stað, tí einki er so tungt sum at boksast við ein, ið bert sær ein máta at gera tingini uppá. Gevið eisini altíð vitan frá tykkum við gleði, tí tú fært oftast eins nógv aftur sum tað, tú gevur, og afturat fært tú gott vinalag – einki er betri enn eitt arbeiðspláss, har huglagið og samanhaldið er gott.

– Eg hevði ein lærara í skúlanum, sum ofta tók soleiðis til: "Gloymið ongantíð tykkara uppruna og verið altíð ímóti øðrum, sum tit ynskja, at onnur skulu vera ímóti tykkum". Og onkur annar segði seg ongantíð hava møtt tí menniskja, sum visti alt, ið er vert at vita, um alt, segði Tummas Eli Høj Joensen.

## Watt og Diesel

Hann hugleiddi síðan um stóra týdningin, sum fyrst James Watt, ið bygdi fyrstu dampmaskinuna, og síðan Rudolf Diesel, faðirin at dieselmotorinum, hava havt fyri menningina av ídnaðarsamfelagnum.

– Saman við ravmagninum skaptu teir grundarlagið undir ídnaðinum, og teir vóru orsøk til eina markanta menning av skipsvinnuni og ídnaðinum á landi. Samstundis skaptu teir grundarlagið undir okkara faki, maskinmeistarafakinum.

– Men fakið hevur tó onkursvegna altíð verið har, tí hvørjum senda vit boð eftir, tá vaskið er typt, ein sikring er brostin, bilurin er uppsteðgaður, eitt amboð er brotnað, ella okkurt annað er? Jú, onkrum slagi av maskinmanni, segði Tummas Eli Høj Joensen.

## Eftirspurt fakfólk

Soleiðis hevur tað verið í øldir, staðfesti hann, tó at sjálv tøknin hevur flutt seg frá tí primitiva í fornum døgum til hátøknina, vit kenna í dag.

– Maskinmeistarin er at finna allastaðni. Vit hava ábyrgdina av tí tekniska á sjúkrahúsum, orkuverkum, fjarhitaskipanum, vindmyllum, oljuboring, umborð á øllum skipum, og vit gera eisini skipaeftirlitini og hava tískil eftirlitið við trygdini hjá sjófólki okkara. Og so framvegis, ja, vit eru snøgt sagt allastaðni, har holl, teknisk vitan og leiðsla krevst, fyri at hjólini kunnu mala.

– Tí sigi eg við allar tykkum maskinmeistarar, verið ernir av tykkara faki og ikki minni av tykara prógvi, segði Tummas Eli Høj Joensen at enda í røðu síni og ynskti øllum til lukku og eydnu á lívsleiðini.



***Nýklakti landsstýrismaðurin í útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, helt røðu***

*Mynd: Joan B. Poulsen, Vinnuháskúlin*



***16. september fingu fýra maskinmeistarar prógv. Úr vinstru eru tað Bárður Anthoniussen, Steen Rói Lorenzen, Eirikur Thomsen og Egin Tollaksson Kass.***

*Mynd: Maria Lava Jacobsen, Vinnuháskúlin*



***15. februar fingu Jóhan Petur í Niðristovu, vinstrumegin, og John Klakkstein prógv sum maskinmeistarar***

*Mynd: Maria Lava Jacobsen, Vinnuháskúlin*

# Minningarorð um Poul Hera Selfoss

**Hesi minningarorð um Poul Hera Selfoss vórðu løgd á heimasíðuna hjá Maskinmeistarafelagnum stutt eftir nýggjár, tá Tummas Eli Høj Joensen enn var formaður**

Tað var ein sannur hvøkkur fyri okkum í Maskinmeistarafelagnum beint fyri nýggjár at frætta, at Poul Heri Selfoss, nevndarlimur okkara, brádliga var deyður 29. desember bara 34 ára gamal.

Eg kom at kenna Poul Hera ígjøgnum Maskinmeistarafelagið. Eg hitti hann á aðalfundinum í 2021, tá eg sjálvur bleiv valdur í nevndina, og hann stillaði upp sum tiltakslimur og bleiv valdur. Á aðalfundinum í fjør hitti eg hann aftur, og tá bleiv hann fyrstvaldur sum tiltakslimur, og var tí við á onkrum nevndarfundum. Men tá Ólavur Gunnarsson vegna nýtt leiðarastarv legði frá sær sum formaður seinni í fjør, og eg tók við sum formaður, fekk Poul Heri fast sæti í nevndini.

Hann var sera blíðlyntur, fyrikomandi og lættur at koma í prát við, og tí var eisini lætt at koma at kenna Poul Hera, hóast mær bert untist at kenna hann í alt ov stutta tíð.

Tá nevndin umskipaði seg eftir formansskiftið, yvirtók Poul Heri míni ábyrgdarøki í nevndini, sum vóru Handilsskip, FAS og FMU, og hann røkti hesi til lítar.

Í øllum nevndararbeiðinum var hann nærlagdur og málsøkin og vísti altíð ein vilja at finna loysnir – alt eginleikar, sum eru sera góðir at hava, tá nevndararbeiði skal gerðast í einum felag sum Maskinmeistarafelagnum, ið fevnir so



*Nevndarlimurin Poul Heri Selfoss andaðist 29. desember 2022 bert 34 ára gamal*

*Mynd: Privatmynd*

vítt, tá tað ræður um starvsøki og sáttmálar hjá limunum.

Poul Heri arbeiddi hjá Look North í Klaksvík, har hann og familjan búðu, og tað var altíð spennandi at hoyra hann greiða frá sínum arbeiði og framleiðsluni har. Ein merkti beinanvegin, at hann brendi fyri sínum arbeiði og sínum arbeiðsplássi. Eisini er mær sagt, at vóru teknisk ivamál á arbeiðsplássinum, so var Poul Heri ein tann besti at loysa slíkar uppgávur.

Sum heilt ungur var Poul Heri aktivur í ítrótti í Miðvágs Bóltfelag, MB, í barndómsbygdini Miðvági. Mínar royndir eru, at ítróttarfólk ofta hava serligar og góðar arbeiðseginleikar í øðrum virksemi enn bara ítrótti. At hetta eisini galt Poul Hera, sóu vit allir í nevndini, har alt arbeiðið hjá honum var merkt av ágrýtni og eldhuga.

Vit í Maskinmeistarafelagnum hava mist ein góðan nevndarlim og ein góðan vin.

Vit vóru til jarðarferina og fingu eisini har at hoyra, at Poul Heri var eitt gott og arbeiðssamt menniskja og fyri arbeiðspláss sítt ein góður maður.

Ikki minni fingu vit at hoyra, at Poul Heri var ein stak góður og stuðlandi pápi og maður.

Vit í Maskinmeistarafelagnum hava ta djúpastu samkenslu við tykkum øllum, Susan og børnini Elspa Mia og Jónhard, og mátti Várharra troystað og styrkt tykkum í tykkara stóra sakni og sorg eftir missin av ein góðum pápa og manni.

Við hesum vilja vit í Maskinmeistarafelagnum lýsa frið yvir tey góðu minnini, sum vit hava um skilamannin Poul Hera Selfoss.

***Vegna nevnd og umsiting í Maskinmeistarafelagnum***
***Tummas Eli Høj Joensen***

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**19. august:**
Fundur í nevndini um, hvussu gerðast skal, nú formaðurin leggur frá sær.

**1. september:**
Formanskifti. Nýggjur formaður tekur við, og fyrverandi formaður takkar fyri seg.

**20. september:**
Fundur við LÍV um samlagstryggingina. Her verða fleiri fundir um, hvussu haldast skal fram við hesi trygging, sum støða má takast til áðrenn 1. januar 2023.

**21. september:**
Fundur hjá Fiskimannafelagnum saman við FSN og fiskimannafelagnum viðvíkjandi Dómi í Landsrættinum.

**29. september:**
Nevndarfundur á skrivistovuni. Ymiskt á skrá, og so í høvuðsheitinum skipan av nevndini og komandi sáttmálasamráðingar.

**20. oktober:**
Fundur í Sjóvinnustýrinum viðvíkjandi "Sjóvinnuforum 2023".

**20. oktober:**
Fundur við LÍV um samlagstryggingina. Nýggjar treytir fyri tryggingargjald og oyðublað við treytum at fylla út hjá komandi limum.

**23-25. oktober:**
Fundur í NMF í Stockholm.

**27. oktober:**
Fundur á Ríkisumboðnum viðv. Nationalbanken v.v Færøernes økonomi.

**16 . november:**
Fundur við LÍV viðvíkjandi Samlagstryggingini. Nú er mestsum komið á mál.

**18. november:**
Nevndarfundur. Fokus á komandi samráðingar.

**2. november:**
Niðurstøða gjørd viðvíkjandi Samlagstryggingini.





# FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið

| Navn | Føðingardagur | Bygd/býur | Aldur |
|---|---|---|---|
| Jørgen Poulsen | 5/5-1952 | Hoyvík | 70 ár |
| Símun Dahl | 18/5-1952 | Klaksvík | 70 ár |
| Eyðun Jespersen | 15/7-1952 | Tórshavn | 70 ár |
| Torkil Strøm | 7/5-1962 | Vágur | 60 ár |
| Jack Toftegaard | 19/5-1962 | Fuglafjørður | 60 ár |
| Pauli Gunnl. Høgnesen | 10/7-1962 | Vestmanna | 60 ár |
| Allan Poulsen | 30/7-1962 | Saltangará | 60 ár |
| Heðin Mortensen | 31/7-1962 | Hoyvík | 60 ár |
| Høgni Hammerfoss | 18/5-1972 | Froðba | 50 ár |
| Leif Klein | 11/6-1972 | Tórshavn | 50 ár |
| Helgi Eysturberg | 20/5-1982 | Tvøroyri | 40 ár |
| Angus Winth. Olsen | 22/5-1982 | Hoyvík | 40 ár |
| Jákup Martin á Válinum | 9/6-1982 | Vestmanna | 40 ár |
| Fróði Festirst. Nielsen | 9/6-1982 | Eiði | 40 ár |
| Súni Kvilt Sigurðsson | 11/6-1982 | Saltangará | 40 ár |
| Erhard Olaf Nybo | 19/6-1982 | Tórshavn | 40 ár |
| Sigmundur Nolsø | 24/7-1992 | Hoyvík | 30 ár |



Nýggj tænasta frá LÍV

# Vel títt váðastøði

Øll skulu vit spara saman til okkara eftirløn, og nú kanst tú velja tað váðastøði, tú vilt hava.

**Vel eitt váðastøði, ið hóskar til tín.**



## varið

Miðað verður eftir

**45%** lánsbrøvum

**55%** partabrøv & alternativar íløgur

Títt váðastøði í dag



## miðal

Miðað verður eftir

**35%** lánsbrøvum

**65%** partabrøv & alternativar íløgur



## høgt

Miðað verður eftir

**15%** lánsbrøvum

**85%** partabrøv & alternativar íløgur



## partabrøv

**100%** partabrøv

## Hvat skal eg gera?

Set teg í samband við okkum, um tú vilt broyta til annað váðastøði, ella um vilt frætta meira um tínar møguleikar.

**Vit sita klár á tlf 31 11 11**

**Les meira á liv.fo**

liv.fo